# Lívlong Vegleiðing í Føroyum
# - ein ávegis ætlan

**- við mannagongdum fyri íverksetan**
**á stovnum og í kommunalum økjum**

**Bólkauppgáva hjá MA lesandi í vegleiðing**

**Undirvísarar: Raimo Vourinen & Sif Einarsdóttir**

**Fróðskaparsetur Føroya**

**á Várið 2016**

## Innihaldsyvirlit


1. Ætlan fyri lívlanga vegleiðing í Føroyum ..... 5
1.1 Inngangur ..... 5
1.2 Trupulleikaorðing ..... 5
1.3 Skilvís grundgeving og mál fyri lívlanga vegleiðing ..... 6
1.4 Frágreiðing um vegleiðing – hvat hugsa vit um tá vit siga LLV ..... 6
1.5 Politiskur samanhangur og lykladrívmegi fyri broyting í Føroyum ..... 6
1.6 Støðan hjá vegleiðing í Føroyum ..... 7
1.7 Visión ..... 8
2. Skipan av lívlangari vegleiðing ..... 9
2.1 Leiðreglur fyri evni, sum ganga uppá tvørs av politikkum og skipanum, ið snúgva seg um lívlanga vegleiðing ..... 9
*Leiðregla 1: Um Career Management Skills (CMS)* ..... 9
*Leiðregla 2: Atgongd til Lívlanga vegleiðing* ..... 12
*Leiðregla 3: At tryggja góðsku í lívlangari vegleiðing* ..... 14
*Leiðregla 4: At meta um virknisdygdina á at seta á stovn lívlanga vegleiðing* ..... 15
*Leiðregla 5: Strategisk leiðsla: Samstarv og samskipan* ..... 17
*Leiðregla 6: Menning av kunningarskipan fyri yrkismøguleikar* ..... 19
*Leiðregla 7: Útbúgving, læra og kvalifisering av vegleiðarum* ..... 21
*Leiðregla 8: Fígging av tænastuni lívlong vegleiðing.* ..... 23
*Leiðregla 9: Kunningar- og samskiftistøkni* ..... 24
2.2 Leiðreglur fyri politikk og skipanir fyri lívlangari vegleiðing í útbúgvingarskipanini ..... 27
*Leiðregla 10: Lívlong vegleiðing fyri skúlanæmingar* ..... 27
*Leiðregla 11: Lívlong vegleiðing fyri yrkisútbúgvingarøkið* ..... 30
*Leiðregla 12: Lívlong vegleiðing fyri hægri útbúgvingar* ..... 34
*Leiðregla 13: lívlang læring og vegleiðing fyri tilkomnar samfelagsborgarar* ..... 37
2.3 Leiðreglur fyri politikk og skipanir fyri lívlangari vegleiðing á yrkis- og eldraøkinum í útbúgvingarskipanini ..... 40
*Leiðregla 14: Lívlong vegleiðing fyri starvsfólk* ..... 40
*Leiðregla 15: Lívlong vegleiðing til tilkomin arbeiðsleys* ..... 42
*Leiðregla 16: Lívlong vegleiðing fyri eldri* ..... 43
2.3 Leiðreglur fyri politikk og skipanir fyri lívlangari vegleiðing av bólkum við serligum avbjóðingum ..... 45
*Leiðregla 17: Lívlong vegleiðing fyri viðbrekin ung, sum eru í vandabólki.* ..... 45
*Leiðregla 18: Lívlong vegleiðing fyri borgarar við skerdum møguleikum í Føroyum* ..... 48
3. Niðurstøða ..... 51

Keldur til leiðreglurnar 1-18 .......................................................................................... 52
Keldur ................................................................................................................................ 65

# 1. Ætlan fyri lívlanga vegleiðing í Føroyum

## 1.1 Inngangur

Útbúgving og læra eru grundarsteinar í seinmodernaða vitanarsamfelagnum, og tí er vegleiðing um fjølbroyttar útbúgvingar-, læru- og arbeiðsmøguleikar av alstórum týdningi, fyri at samfelagið kann fylgja altjóða menningini.

Landsstýrismaðurin í mentamálum setti í skrivi, dagfest 26. januar 2007, ein arbeiðsbólk, sum skuldi kanna vegleiðingarskipanina í Føroyum við atliti at nýskipan. Endamálið var at fáa eina greiða skipan og at dagføra vegleiðingina við tí fyri eyga at styrkja førleikan hjá hinum einstaka at velja útbúgving og arbeiði.

10. desember 2007 handaði arbeiðsbólkurin landsstýrismanninum í mentamálum "Álit um at endurskoða vegleiðingarskipanina" (Arbeiðsbólkur, 2015). Sum úrslit av hesum byrjaðu Master of Arts (MA) lesandi í vegleiðing á Fróðskaparsetri Føroya í 2013, og sum part av lesnaðinum hava vit lesandi fingið sum uppgávu at gera uppskot um "Tjóðarætlan fyri lívlanga vegleiðing", sum ætlanin er at handa avvarðandi myndugleikum innan lestrarskeiðið er runnið í juni 2017.

## 1.2 Trupulleikaorðing

MA lesandi í vegleiðing halda tað er av stórum týdningi, at vit menna stovns- og økisætlan fyri *Lív-Langa-Vegleiðing*, stytt LLV, í Føroyum. Tí hava vit arbeitt við hesum spurningi:

**Hvussu kann ein tjóðarætlan fyri LLV skipast í Føroyum?**

Leistir fyri skipan av LLV eru at finna í ES-tilmælum frá *European Lifelong Guidance Policy Network*, stytt ELGPN, (ELGPN, 2015). Tey eftirmeta javnan samfelagsnyttuna av LLV og grannalond okkara nýta øll sama LLV leist, hóast LLV skipanirnar eru ymiskar í ymsu londunum. Tá tað í Føroyum ikki finnast nakrar leiðreglur, sum eru grundleggjandi fyri skipan av vegleiðing, hava vit valt at leggja orku í at tillaga evropisku leiðreglurnar til føroysk viðurskifti. Vit hava tí grundað okkara arbeiði á tær 18 leiðreglurnar fyri LLV í Føroyum á ELGPN leiðreglurnar (ELGPN, 2015).

Tilfarið er framleitt av teim MA lesandi í vegleiðing á heystið 2015 og hendan útgávan er merkt av, at tilfarið ikki er samskrivað. Okkara vón er, at tilfarið kann verða gott grundarlag undir víðari arbeiði og geva íblástur til tjóðarætlan fyri LLV í Føroyum. Vit hava valt at seta keldurnar fyri leiðreglurnar síðst í uppgávuni heldur enn millum hvørja leiðreglu.

## 1.3 Skilvís grundgeving og mál fyri lívlanga vegleiðing

Í seinmodernaðu tíðini, vit eru í, er tað ikki so vanligt longur at hava sama starv alt arbeiðslívið. Útbúgvingar, arbeiðsviðurskifti og yrkismøguleikar broytast støðugt í mun til alheimsgerðina, serliga innan tøkni og búskaparlig viðurskifti. Flytfør arbeiðsmegi, umbroytiligur arbeiðsmarknaður, arbeiðsloysi, fráflyting og immigratión seta nýggj krøv til politikk innan vegleiðing, og tørvur er á at skipa professionella vegleiðing, sum kann veita borgarum haldgóða vegleiðing. Livikor, so sum karrieruskifti, arbeiðsloysi, fólka til- og fráflyting, sjúka, skilnaður, einsemi og sorg, kunnu tykjast sum møtimiklar forðanir, har familjan ikki longur er før fyri at veita munagóða vegleiðing (Vuorinen & Watts, 2012). Grannalond okkara hava tí øll skipaðan útbúgvingarpolitikk og LLV, og stundin er komin at skipa tilboð um LLV fyri allar borgarar í Føroyum eisini.

## 1.4 Frágreiðing um vegleiðing – hvat hugsa vit um tá vit siga LLV

Lívlong vegleiðing hevur sum mál at stuðla fólkum í øllum aldri og á øllum karrieru-stigum at menna seg starvsliga. Vegleiðarar arbeiða við at upplýsa borgarum um starvsleiðir, ráðgeva og vegleiða í persónligum og sosialum viðurskiftum, meta um evnir og hegni teirra og leiðbeina teimum innan útbúgving og yrki. Dygdargóð vegleiðing eigur at verða atkomilig hjá øllum borgarum í føroyska samfelagnum uttan mun til arbeiðsstøðu, sosialan status, uppruna og kyn. Vegleiðingin stuðlar sosialari inklusión við at taka upp tørv hjá vandabólkum, t.d. hjá ungum borgarum, sum fara úr fólkaskúlanum uttan at hava fingið arbeiði, lærupláss ella fara undir framhaldandi útbúgving og hjá tilflytarum, sum ynskja at verða innlimað í arbeiðsmarknaðin og samfelagið. Vegleiðing stuðlar lívsvirðisvøkstri (Arbejderbevægelsens Erhvervsråd, 2015), búskaparligum vøkstri í samfelagnum og menning av arbeiðsmarknaðinum við at sameina tørvin hjá tí einstaka borgaranum við tørvin hjá arbeiðsmarknaðinum og fyritøkum (CEDEFOP, 2015). Dygdargóð vegleiðing hevur vælútbúnar vegleiðarar, sum hava felags etiskar leiðreglur og tagnarskyldu.

## 1.5 Politiskur samanhangur og lykladrívmegi fyri broyting í Føroyum

LLV fær alt meiri uppmerksemi bæði á evropiskum stigi og á tjóðarstigi. LLV setir bæði sosial og búskaparlig mál og er neyðugur partur av hugtakinum *Lív-Long-Læra*, stytt LLL.

Fýra øki eru neyðug at byggja professionella lívlanga vegleiðingina á:

- Skipan og menning av at førleikameta yrkisførleikar
- Atkomilig vegleiðing
- Trygd fyri góðskumeting og próvtilfari, sum kann stuðla undir politik og skipan av vegleiðingini
- Samskipan av vegleiðaratænastum

(Vuorinen & Watts, 2012, s. 9)

## 1.6 Støðan hjá vegleiðing í Føroyum

Vit lesandi á MA-Vegleiðing meta tað hava alstóran týdning, at vegleiðing er dygdargóð og viðkomandi fyri einstaka borgaran. Gjøgnum ymisku skeiðini í útbúgvingini hava vit fingið innlit í, hvussu tey í londunum kring okkum hava skipað vegleiðaraøkið, og vilja vit virka fyri, at vegleiðing í Føroyum verður eitt yvirskipað tilboð til allar borgarar.

Samfelagið er lítið og rættiliga einsháttað (homogent). Tað merkir at borgararnir eru rímiliga javnt stillaðir sosialt, og frástøðan frá einstaka borgaranum til eitt nú politisku skipanina er stutt, og lætt er at koma í samband við tey stýrandi.

Í londunum kring okkum, er áhugin fyri vegleiðing í vøkstri. Í ES verður arbeitt málrættað við at menna vegleiðara økið, við m.a. fyriskipan av reglugerðum og gransking. Vegleiðing verður mett sum eitt amboð, sum kann vera við til at fremja ávís politisk úrslit og fremja lívsvirði fyri einstaka borgaran. Sum eitt framkomið vælferðarsamfelag hava vit í Føroyum eisini tørv á at styrkja vegleiðaraøkið, og at hugtøk sum *lívslong læra*, LLL, *lívslong vegleiðing*, LLV, og CMS (yrkismenningarførleikar) fáa kjølfesti í okkara samfelag.

Innan útbúgvingarøkið er tørvur er á at skipa vegleiðingina betur, eitt nú tá næmingar fara úr fólkaskúlanum og skulu velja yrkis- ella útbúgvingarleið. Her er tørvur er á at styrkja vegleiðaraøkið, og miðað eigur at vera eftir størri gjøgnumskygni til teir møguleikar, sum tann ungi hevur fyri vali av yrkis- ella útbúgvingarleið. Innan skúlaskipanina er vegleiðingin rímiliga væl skipað og dagførd. Innan yrkisøkið eigur vegleiðingin at styrkjast, og tørvur er á betri samskipan av yrkismøguleikum, sum eru í Føroyum.

Sum vegleiðaralesandi kunnu vit staðfesta, at tørvur er á fleiri vegleiðarum uttan fyri skipaðu vegleiðingina á skúlunum. Tað er trupult hjá borgarum, sum eru uttan fyri skúlaskipanina, at

fáa vegleiðing. Í ALS-skipanini er møguleiki hjá arbeiðsleysum at fáa vegleiðing av “kveikjararum”, sum vegleiða og eggja tí arbeiðsleysa til førleikamenning við stuttum skeiðum. Hetta merkir, at borgarar, sum ynskja ella eru noyddir at broyta yrkisleið, hava ikki møguleika at fáa vegleiðing.

Í einum framkomnum samfelag sum hinum føroyska, kann økt gjøgnumskygni um yrkis- og útbúgvingarmøguleikar og eitt styrkt vegleiðaranetverk vera við til at minka um vandan fyri, at borgarar flyta av landinum, orsakað av, at teir ikki síggja lestrar- og yrkismøguleikarnar í okkara samfelag. Hetta kann vera við til at minka um vandan fyri *“brain drain” og skeiklingina í kynslutfallinum*. Styrkt vegleiðing kann eisini virka fyri at borgarar finna starv eftir lokna útbúgving, bæði fyri tey, sum búgva í Føroyum, og fyri tey, ið ynskja at flyta heim eftir lokna útbúgving.

Tað er ein sannroynd, at skulu vit styrkja vegleiðaraøkið í Føroyum, mugu vit sum vegleiðarar arbeiða miðvíst fyri hesum. Vit mugu staðfesta, at politiska skipanin ikki hevur nóg nógv fokus á vegleiðing. Í løtuni er tað soleiðis, at skipaða vegleiðingin innan skúlaøkið verður umsitin av mentamálaráðnum, almannamálaráðið veitir ávísa vegleiðing til brúkarar í tí skipanini, Arbeiðsloysisskipanin (ALS) veitir vegleiðing til arbeiðsleys, men í politisku skipanini sum heild sakna vit, at vegleiðing verður raðfest. Fyrst og fremst við at halda áfram við at útbúgva vegleiðarar, harnæst við at seta fleiri vegleiðarar í starv runt um í samfelagnum. Fyri okkum lesandi kann tað tykjast, sum politiska skipanin ikki hevur fingið eyguni upp fyri, hvat gagn vegleiðing kann gera fyri samfelagið. Talan er her um eitt yrkisøkið, sum kann mennast við kunningarátøkum, hagtalstilfari og í framtíðini eisini gransking innan økið.

Staðfestast kann, at okkum tørvar eina yvirskipaða ætlan (strategi) fyri vegleiðingarøkið í Føroyum. Ein tílík ætlan eigur at taka støði í, at borgarin er áhugaður í møguleikum fyri lívlangari læru og harvið hava møguleika fyri lívlangari vegleiðing. Við eini tílíkari ætlan hava vit eitt amboð, sum fevnir um borgarar í øllum aldrum og øllum lívsstøðum, ein langtíðarætlan fyri vegleiðing í Føroyum.

## 1.7 Visión

*At øllum borgarum í Føroyum stendur í boði, at fáa dygdargóða vegleiðing um yrkis- og útbúgvingarmøguleikar, um- og eftirútbúgvingarmøguleikar við atliti at lívlangari læru.*

# 2. Skipan av lívlangari vegleiðing

Í august 2015 var heiti á skeiði á MA útbúgvingini fyri vegleiðing, *Developing Institutional and Regional Stratigies in Guidance Provision - part ll*, við Raimo Vuorinen, har partur av skránni var gjøgnumgongd av ELGPN leiðreglum fyri vegleiðing. Leistir fyri skipan av LLV eru at finna í ES-tilmælum frá *European Lifelong Guidance Policy Network* (ELGPN, 2015). Leiðreglurnar eru grundleggjandi, tá talan er um skipan av LLV, og hava vit tí tillagað evropisku leiðreglurnar til okkara viðurskifti.

## 2.1 Leiðreglur fyri evni, sum ganga uppá tvørs av politikkum og skipanum, ið snúgva seg um lívlanga vegleiðing

### *Leiðregla 1: Um Career Management Skills (CMS)*

**Lýsing**

Hugtakið CMS verður í *Guidelines for Policies and Systems Development for Lifelong Guidance* (5th Draft, 2014) lýst sum:

*"Career Management Skills (CMS) refers to a set of competances (knowlegde, skills, attitudes) that enable citiezens at any age or stage of developement to manage their learning- and work life paths".*

Tað vil siga, at hugtakið fevnir um førleikar sum kunnleika, evnir og hugburð hjá einstaka borgaranum óansað aldur, at vera førur fyri at skipa egna útbúgvingar-, yrkis- og lívsleið.

**Persónlig viðurskifti:** CMS er við til at menna førleikar hjá einstaka borgaranum til at handfara persónlig virðurskifti, at duga at skyna á persónligari styrki og áhugamálum, at menna sosialar førleikar, førleikar at sjálvsmeta (sjálvsrannsakan) og førleikar at leggja ætlanir.

**Læruúrtøku:** CMS mennir tilvitskuna um læring (útbúgving), og týdningin av at luttaka í og vísa áhuga fyri læringini, og fær einstaka borgaran at skilja sambandið millum sjálvið, læring (útbúgving) og arbeiðið.

**Skipan av egnari yrkis- og lívsleið:** CMS mennir førleikarnar hjá einstaklinginum at handfara egna yrkis- og lívsleið. Bæði tá tað snýr seg um 1) at velja og skifta yrkisleið, 2)

tilvitað og kritisk at meta um læru- og yrkismøguleikar, 3) at leita fram upplýsingar um læru- og yrkismøguleikar, og 4) at sambinda hesar upplýsingar til egin áhugamál, og at taka avgerðir eftir egnum áhugamálum.

Gjøgnum lívsskeiðið verða CMS førleikarnir (kunnleiki/vitan, evnir og hugburður) framhaldandi mentir soleiðis, at einstaki borgarin, til eina og hvørja tíð í lívsskeiðnum, kann vera tilvitaður um læru- og yrkismøguleikar honum standa í boði.

**Hví er hetta týdningarmikið?**

Í fólkaskúlahøpi kann menning av CMS leggja lunnar undir eina áhaldandi menning av karrierusamleika, heilt frá barnaárum, eina stigvísa menning av sjálvstilvitan, lívstreysti og læring, sum heldur fram alt lívsskeiðið. Samanumtikið fer CMS førleikin eisini at bøta um arbeiðsgegnið og arbeiðsførleikarnar hjá tí einstaka á einum umskiftiligum arbeiðsmarknaði.

Í arbeiðslívinum førir menning av CMS við sær, at arbeiðspláss fáa ein starvsfólkahóp, ið dugir væl at raðfesta, seta sær mál og kennir egnar dygdir og avmarkingar. Hetta økir um framtakssemið hjá borgaranum og við tí eisini hjá arbeiðsplássinum, og er harafturat við til at samtíðartryggja arbeiðsmegina. Umframt at tað eisini økir um karrieru- og arbeiðsframstigini hjá tí einstaka borgaranum.

Fyri borgaran, ið av onkrari orsøk ikki er í aktivu arbeiðsmegini kann CMS vera júst tað, ið ger, at borgarin aftur verður partur av arbeiðsmegini. Soleiðis kann CMS-førleikin vera við til at skapa sosiala inklusjón eins og eitt virkið samfelagsinni.

Í samfelagnum sum heild kann CMS økja um arbeiðssemið og harvið stimbra kappingarførið hjá samfelagnum. Arbeiðsmegin verður fleksiblari, og bæði eftirlagingarføri (adaptability) og mobilitetur økjast. Við at menna CMS førleikar hjá einstaka borgaranum, verður gongd sett á eina framgongd, har borgarin verður førur fyri at gera arbeiðssetningar og eyðmerkja strategiir, ið skulu til fyri at náa ávísum málum. Hetta hevur jaliga ávirkan á tann einstaka, familjuna og samfelagið sum heild.

**Hvat er góð mannagongd?**

Politikkur og skipanir, sum:

- stuðla undir og menna karmar fyri, at CMS førleikar hjá føroyingum verða mentir, og at skipa fyri langsiktaðari heildarætlan fyri CMS. At gera ásetingar um úrtøku av

CMS frá forskúla til miðnám, eftir útbúgvingarstigið og eftir serligum tørvi annars. Ásetingin av CMS úrtøku fevnir um teir førleikar, sum gera borgaran føran fyri at taka virknan lut í handfaringini av egnum læru- og yrkisvali, og at relatera hesi í mun til framtíðarútlit og framtíðarætlanir. CMS førleikarnir kunnu tilognast í formligum frálæru- og uppláeringarhøpið, antin sum tilrættisløgd útbúgving ella sum tvørfakligir førleikar;

- skipa CMS sum lærugrein, ið byggir á námsætlan, tillagað til ymisku floksstigini frá forskúla til miðnám;
- stuðla frálæru av CMS til arbeiðsleys og arbeiðssøkjandi;
- útbúgva lærarar og lærumeistarar, so hesi kunnu geva eina munadygga undirvísing í CMS;
- lívga um frálæruna, ognanina og menningina av CMS í yrkishøpi (HR menning, endurskúling og átøk fyri arbeiðsleys og bólkar, sum eru í vanda fyri at gerast arbeiðsleysir);
- stuðla eftirmeting av úrtøkuni av slíkari frálæru og venjing;
- taka læruumhvørið til eftirtektar (mentan, skúlaverk, upplæring, umskúling, námsætlanir og námsfrøðiliga siðvenju); og
- stuðla undir tvørgeiraðum hugburði (cross sector approach), íroknað samstarvið millum ymsar áhugabólkar, sum stuðla undir framhaldandi menninga av CMS kunnleikanum millum ymsu geirarnar.

**Núverandi støðan**

CMS er ikki ein skipaður partur av vegleiðingini í Føroyum, men námsætlanin fyri lestrarmenning, sum kom í 2013, er partvís eitt stig á vegnum, skilt á tann hátt, at førleikamenningin, sum er endamálið við lærugreinini, mest sum bara er vend móti lestrar- og ikki arbeiðslívinum. Tó koma partar av førleikunum, sum lestrarmenningin stuðlar upp undir, eisini fólki til góðar í arbeiðslívinum, t.d. tilvit um arbeiðslag, arbeiðsførleikar, styrkir, veikleikar, at seta sær mál o.s.fr. Umframt kunning um arbeiðslív og útbúgvingarmøguleikar, ið føroyska samfelagið hevur brúk fyri.

**Góð ráð til íverksetan**

Stig eiga at verða tikin til at kanna, hvussu londini kring okkum hava gjørt viðvíkjandi CMS,

og hvørji ítøkilig úrslit grannar okkara kunnu vísa á. Hetta kann gerast við t.d. at seta ein arbeiðsbólk, har umboð frá ymiskum geirum í samfelagnum luttaka.

Innan útbúgvingargeiran eigur t.d. mentaamálaráðið at taka stig til 1) at gera námsætlan fyri CMS, 2) at seta fakið á tímatalvuna hjá øllum floksstigum, 3) at gera frálærutilfar um CMS, við støði í føroyskum viðurskiftum, til føroyska ungdómin, 4) miðvíst at skipa fyri vegleiðaraútbúgving og skeiðvirksemi innan vegleiðaraøkið, soleiðis at føroyska samfelagið til eina og hvørja tíð hevur kvalifiseraðar vegleiðara innan CMS og 5) at virka fyri tvørgeiraligum sambondum um vegleiðing í Føroyum solieðis, at t.d. dagstovnar, skúlar, partarnir á arbeiðsmarknaðinum, og aðir áhugapartar samstarva um at menna CMS førleikarnar hjá øllum borgarum í landinum.

### *Leiðregla 2: Atgongd til Lívlanga vegleiðing.*

**Lýsing**

Við *atgongd til lívlanga vegleiðing* verður hugsað um møguleikar hjá borgarunum at hava atgongd til vegleiðing alt lívið. Lívlong vegleiðing fevnir um vegleiðing til sjálvhjálp, vegleiðing til smærri og størri avgerðir, har borgarin skal taka meiningsfullar avgerðir og val viðvíkjandi yrkissleið, venjing og arbeiði, og avgerðir, sum ávirka lívsviðurskiftini hjá viðkomandi. Vegleiðingin eigur at skipast sum tænasta, har borgarin kann hitta vegleiðaran “andlit til andlits” (sum einstaklingur og/ella í bólki) og sum tænasta, ið verður gjørd í fjarstøðu gjøgnum telefon ella alnótina.

**Hví er hetta týdningarmikið?**

Við at betra um atgongdina til LLV verður stuðlað undir javnbjóðis møguleikum fyri allar borgarar, sosialari javnstøðu, sosialum mobiliteti og sosialari miðsavnan.

Við LLV verður einstaki borgarin meira tilvitaður um yrkis- og útbúgvingarmøguleikar, sum finnast her á landi og í øðrum londum. Hetta viðvirkar til størri lívsvirði fyri einstaka borgaran, gevur fleiri møguleikar og nýggjar avbjóðingar, sum skapa menning í samfelagnum.

**Hvat er góð mannagongd?**

- At menna skipaða vegleiðing, sum tekur atlit til bæði beinleiðis, andlit-til-andlit-vegleiðing og vegleiðing í fjarstøðu, so sum gjøgnum telefon og alnótina. Skipaða vegleiðingin skal taka atlit til, at borgarar hava ymiskan tørv á vegleiðing.
- Vegleiðingin skal vera lætt atkomilig, og atlit skulu takast til tørv og livikorini hjá einstaka borgaranum.
- At seta lívlanga vegleiðin á dagsskrá í føroyska samfelagnum, og menna hugtøk, kunningartilfar og amboð.
- At menna CMS-førleikar hjá borgarunum.
- Málrætta vegleiðing ímóti bólkum, har vandi er fyri sosialari- og peningaligari útihýsan.
- At vegleiðingin arbeiðir tvørgreinaliga, fakliga og geiraliga.
- At vegleiðingin er opin fyri nýggum møguleikum til miðlan av vegleiðing.

**Núverandi støðan**

Í dag er ein eingin samskipað atgongd til LLV í Føroyum. Sum víst verður á í t.d. leiðreglu 8 er skipað vegleiðing á fólkaskúlum og á miðnámsskúlunum. Tey, ið gerast arbeiðsleys hava eisini atgongd til vegleiðing. Í øllum øðrum førum er tað upp til hvønn einstakan at finna loysnir. Her hevur netverkið hjá tí einstaka/familjuni ofta avgerandi týdning fyri, hvussu borgarin klárar seg víðari fram. Manglandi atgongd til LLV, og manglandi CMS-førleikar hjá borgarum, kunnu hava við sær sosiala skeivvríggjan, og ávirka møguleikarnar hjá tí einstaka borgaranum at fáa eina góða lívsleið.

**Góð ráð til íverksetan**

Atgongd til lívlanga vegleiðing eigur at standa borgarum í Føroyum í boði. Verandi skipan innan skúlaverkið eigur at styrkjast, td. við at føroyskur ungdómur verður upplærdur og mentur við CMS-førleikum. Settar eiga at vera á stovn vegleiðarastovur kring landið, sum liggja uttanfyri skúlaskipanina, har borgarar í øllum aldri og lívsstøðum, kunnu fáa persónliga vegleiðing um teir lestrar-, yrkis- og lærumøguleikar teimum standa í boði.

### *Leiðregla 3: At tryggja góðsku í lívlangari vegleiðing*

**Lýsing**

Góðskutryggjan av lívlangari vegleiðing vísir til politikk, støði og mannagongdir sum stuðla undir eftirmeting av vegleiðingartænastum, úrslitum og virksemi innan vegleiðing, sæð út frá borgaranum og øðrum áhugapørtum. Endmálið við góðuskutryggjanini av vegleiðingi er áhaldandi menning og framstig innan økið.

**Hví er hetta týdningarmikið?**

- Góðskutryggjan av lívlangari vegleiðing verjir áhugamálini hjá borgarunum við at tryggja, at lívlongu vegleiðingartænasturnar og úrslitini samsvara teimum endamálum, ið ásett eru fyri vegleiðingina.
- At tryggja samanbæri í vegleiðaratænastuni til allar borgarar innan ávís øki alt lívið, uttan mun til landafrøðiligu, sosialu og búskaparligu viðurskiftini hjá borgaranum.
- At tryggja at lívlanga vegleiðaratænastan verður væl gagnnýtt - eisini í mun til skattgjaldaran og aðrar aktørar, ið eru við til at fíggja kostnaðin av tænastuni.

**Hvat er góð mannagongd?**

Politikkur og skipanir, sum:

- skipa lívlongu vegleiðingina í mun til endmálini fyri vegleiðaratænastuna, har atlit verða tikin at øllum áhugapørtum, t.e. teimum, ið brúka tænastuna, teimum ið skipa fyri tænastuni og teimum, ið gjalda fyri tænastuna;
- skipa fyri felags mannagongdum fyri lívlangari vegleiðing, sum eru grundarlag fyri vegleiðing innan hitt almenna og privata, og fevna um øll økir í samfelagnum;
- skipa fyri eftirlits- og eftirmetingarskipanum, við serligum atliti at sjónarhorni borgarans; og
- leggja dent á førleikarnar hjá vegleiðarum. Miðvíst skipa fyri grund- og víðariútbúgving av vegleiðarum, sum útvega tænastur og virksemi innan lívlanga vegleiðing.

**Núverandi støðan**

Vísandi til leiðreglu 2, er eingin samskipað LLV í Føroyum, og heldur ikki politikkir, mannagongdir v.m., sum stuðla undir eftirmeting og góðskutryggjan av vegleiðartænastum.

Vantandi útbúgving hevur sermerkt vegleiðaraøkið í Føroyum. Á sumri 2013 vóru stig tikin til skeið í MA-Vegleiðing á Fróðskaparsetrinum. So útlit eru fyri, at vegleiðaratænastan kann góðskutryggjast og helst mennast í framtíðini.

**Góð ráð til íverksetan**

At útbúgvingin *MA-Vegleiðing* verður boðin út aftur á Fróðskaparsetrinum, og miðvíst verður virkað fyri, at hava høgt útbúgvingarstøði innan øll øki í vegleiðaratænastum. Meira fokus á vegleiðing, m.a. við afturvendandi at skipa fyri vegleiðararáðstevnum.

Í tvørgeirasamstarvi og tvørpolitiskum samstarvi at gera *tjóðarætlan fyri LLV í Føroyum*, har mannagongdir og vegleiðaratænastur verða samskipaðar.

### *Leiðregla 4: At meta um virknisdygdina á at seta á stovn lívlanga vegleiðing*

**Lýsing**

At meta um virknisdygdina av lívlangari vegleiðing snýr seg um at innsavna dátur gjøgnum gransking o.a., um nýtsluna og virknisdygdina av politikki, skipanum og átøkum, ið viðvíkja lívlangari vegleiðing, og eina eftirmeting av teimum. Slík dátuinnsavnan fevnir um upplýsingar um úrslit, íkast og úttak/úrtøka, á útbúgvingarliga, læruliga, yrkisliga og sosiala økinum.

**Hví er hetta týdningarmikið?**

- Innsavnanin av slíkum dátum stuðlar undir menningini av próvgrundaðum politikki
- Tað stuðlar undir fleiri viðurskifti, ið hava við politikkfyrireikan og skipanir at gera, eitt nú menning av strategiskum málum, ráðlegging av tænastum, menning av ætlanum, eyðmerking av gloppum í tænastuveitingini, tørvin á venjing hjá professionellum vegleiðarum og bestu gagnnýtsluna av tilfeingi og íløgum í veitingina.
- Tað tekur upp ábyrgdarspurningar, stuðlar undir samanberingar av vegleiðarasháttum, -amboðum og -háttaløgum, og veitir eitt vandaligt sjónarhorn á spurningin um, hvussu væl hesi kunnu nýtast í ymiskum høpi.

- At hava álítandi próvtilfar um virknisdygdina á vegleiðandi átøkum er ein fortreyt fyri menningini av góðum politikki.

**Hvat er góð mannagongd?**

Politikkur og skipanir, sum:

- stuðla regluligari innsavnan av dátum um úrslit, íkast og úrtøku frá vegleiðing, og eftirlit og eftirmeting av slíkum dátum í mun til kostnað- og nyttugreiningar fyri borgaran og teimum, sum skipa fyri vegleiðingini;
- stuðla einari felags kós, tvørtur um útbúgvingarliga-, læruliga-, yrkisliga- og sosiala økið, tá ið um strategiska ráðlegging í mun til nýggjan politikk ræður;
- virka fyri gransking, ið fremur próvgrundaða ráðlegging og politikk, harímillum marknaðargransking, gransking, ið lýsir ávirkan yvir tíð, og kost-nyttu greiningar;
- eggja til akademiska gransking, sum tekur upp evni, ið eru viðkomandi fyri ráðlegging og politikk;
- stuðla langtíðarætlanum til data-innsavnan, ið kunnu eyðmerkja tørvin á nýggjum, øðrvísi og víðkaðum tænastum og málbólkum;
- taka atlit til dátur, ið snúgva seg um brúkaragagn og brúkaranøgdsemi, og dátur, ið snúgva seg um yrkislæruligu úrtøkuna hjá borgarum;
- stuðla innsavnan og eftirmeting av dátum úr privata geiranum; og
- kunnu veita skilvísar grundgevingar, stuðlaðar av próvførslu, fyri hvussu fígging verður býtt út á ymisk øki og raðfestar bólkar í einum blandaðum høpi av vegleiðaraveitingum.

**Núverandi støðan**

Av tí at vit í Føroyum ikki hava havt nakra siðvenju at veita skipaða LLV, so er heldur ongin innsavnan av dátum gjørd, ið snýr seg um úrslitini av einari slíkari vegleiðing. Nógv er, ið talar fyri, at tað vildi verið gagnligt fyri føroyska samfelagið, um farið varð undir at veita eina væl skipaða LLV. Til tess at góðskutryggja eina slíka vegleiðing er umráðandi at úrslitini av henni støðugt vera endurmett. Hetta kann gerast við at fylgja ráðunum undir yvirskriftini "Hvat er góð mannagongd" omanfyri.

**Góð ráð til íverksetan**

Ofta verður sagt at tað er ein trupulleiki, at føroyska samfelagið er so lítið, og at vit eru so fá, sum búleikast her í landinum. Men júst tað, at vit eru fá, kann gera tað rímiliga lætt hjá okkum at hava eftirlit við úrslitunum av okkara lívslongu vegleiðing. Um rætt verður borið at, og um vit raðfesta støðuga dátuinnsavnan frá byrjan, so kunnu vit uttan iva tryggja, at politikarar og onnur, ið skulu gera av, hvussu raðfest verður, fáa tær dátur, ið teimum tørva, til tess at tey skulu kunna taka so skilagóðar avgerðir, sum gjørligt.

### *Leiðregla 5: Strategisk leiðsla: Samstarv og samskipan*

**Lýsing**

Strategisk leiðsla snýr seg um at menna eina skipaða ætlan fyri LLV í okkara landi. Serliga verður víst til samstarv og samskipandi átøk, har viðkomandi áhugapartar menna eina yvirskipaða ætlan fyri LLV.

Lyklafyribrigdi í at skipa og leggja ætlan fyri LLV fevna um 1) politiska- og umsitingarliga ábyrgd, 2) vitanaðardeiling ímillum ábyrgdarhavarar, 3) miðsavnan mótvegis miðspjaðing (øki og stovnar), 4) luttøku av áhugapørtum innan vegleiðing, 5) yvirskipaðan inkluderandi politikk, sum fevnir um menning av borgarum, lívlanga vegleiðing og virkisførleikamenning, har ábyrgdin er tvørpolitisk, t.e. at fleiri stjórnarráð kenna ábyrgd og eru við til at fyriskipa vegleiðingina til borgararnar.

**Hví er hetta týdningarmikið?**

- Samstarv og samskipandi tiltøk veita og tryggja áhaldandi menning innan LLV og gevur borgarum atgongd til vegleiðaratænastur. Samstarv og samskipan tryggjar gjøgnumskygni og eina breiða tvørgeiraliga tænastu til borgarar í ymiskum lívsstøðum, uttan mun til aldur-, sosial-, fíggjarlig og landafrøðilig viðurskifti.

- Samstarv og samskipan stuðlar felagsfatanini av vegleiðing, sum bøtir um grundarlagið hjá ymisku geirunum at skipa fyri tænastum, deila vitan, háttaløg, amboð o.a.

- Samstarv og samskipan millum áhugapartar, m.a. við at ganga nýggjar tekniskar leiðir, ger LLV og kunning lættari atkomiliga við at vera meira nýskapandi og fjøltáttað.

- Fyri einstaka borgaran hevur samstarv og samskipan serligan týdning, tá spurningar, sum fevna um fleiri økir/stovnar, taka seg upp t.d. í samband við arbeiðsloysi, fráfall o.a.

- Fyri vegleiðaraskipanina vil samstarv og samskipan tvørtur um geirar forða fyri spjaðing og óneyðugum endurtøkum, og tað fer at bøta um nyttuvirðið av vegleiðingini.

- Samstarv og samskipan kann eisini vera við til at tryggja, at LLV er vælskipað og umhugsað, og verður ein liður í tjóðskaparligari menning av útbúgvingum, yrkismøguleikum og øðrum inkluderandi skipanum í samfelagnum sum heild.

**Hvat er góð mannagongd?**

Politikkur og skipanir, sum:

- taka støði í rættindunum hjá borgaranum til LLV og tørvinum hjá brúkarunum sum grundarlagi fyri samstarvi og samskipan;

- fremja tvørgeiraligt samstarv og samskipan fyri LLV ætlanum og skipanum innan útbúgvingar, yrkis og sosiala øki;

- skipa tvørgeiraða heildarætlan fyri vegleiðing;

- skipa tvørgeiraða kunning um vegleiðing til borgarar, har kunnað verður um t.d. góð úrslit, møguleikar við vegleiðaratænastuni o.a.;

- stuðla og menna tí, ið stingur seg upp viðvíkjandi samskipan og samstarvi innan vegleiðing;

- lata upp fyri, at ymiskir áhugapartar verða tiknir við uppá ráð, tá vegleiðarstænastur vera skipaðar og tillagaðar;

- skipa inkluderandi karmar, har lívlong læra, yrkismenning og aðrir tíðandi førleikar vera umrøddir, í mun til hugtakið LLV;

- tryggja javnbjóðis atgongd til vegleiðaratænastur og javnlík krøv viðvíkjandi miðspjaddum veitingum; og
- nýta KT sum amboð, í tann mun borgarin fær gagn av hesum.

**Núverandi støðan**

Sum áður nevnt finst eingin skipað ætlan fyri LLV í Føroyum. Tó eru einstakar verkætlanir í gongd ymsastaðni. T.d. eru tvær kommunur í holt við royndarverkætlanina "TÝTT", sum er samstarv millum barnagarðsøkið og skúla. Annað dømi er brúgvabygging millum fólkaskúla og miðnám, sum verður roynt í nøkrum pørtum av landinum.

"Tann góða tilgongdin" er verkætlan, sum fevnir um næmingar við diagnosu á autismubreiddarøkinum. Verkætlanin hevur fingið góða undirtøku.

Altjóða Skrivastovan skipar hvørt ár í september fyri *Markleysari útbúgving*, sum er eitt kunningartiltak um víðari lesnað fyri lesandi á triðja árið á miðnámi. Skipað varð fyri ráðstevnuni *Jobmatch,* har lesandi á hægri útbúgvingum høvdu møguleika at hitta partarnar á arbeiðsmarknaðinum.

**Góð ráð til íverksetan**

Fyri at samskipa og menna eina heildarætlan fyri LLV er neyðugt við tvørgeirasamstarvi og tvørpolitiskum samstarvi. Tørvur er á at seta á stovn LLV-stovur kring landið, sum samstarva og samskipa vegleiðingina og sum skipa fyri brúgvabygging millum allar avvarðandi stovnar.

Sum ein partur í vegleiðingartænastuni kann KT-vegleiðing gerast eitt virkið amboð.

### *Leiðregla 6: Menning av kunningarskipan fyri yrkismøguleikar*

**Lýsing**

Kunning um yrkimøguleikar (*Careers information*) sipar til alla kunning í øllum miðlum, sum kann stuðla borgarunum í at taka týðandi avgerðir viðvíkjandi læru- og yrkismøguleikum. Kunningin fevnir um vinnuna, arbeiðsmarknaðin, útbúgvingar og skeið á øllum stigum. Eisini er týdningarmikið at kunnað verður um útbúgvingarmøguleikar í útlondum. Arbeiðsmarknaðurin (almenni og privati, arbeiðsgevarar og arbeiðstakarar) er ein týdningarmikil vitanarkelda, tá ið tað snýr seg um útboð og eftirspurning og um viðurskifti á arbeiðsmarknaðinum sum heild. Hesi viðurskifti hava stóran týdning, tá støða skal takast til lestrar- og yrkisleið.

**Hví er hetta týdningarmikið?**

Kunning um yrkismøguleikar gevur fólki møguleika at sammeta teirra støðu, áhugamál og ætlanir við treytir og eftirspurning innan arbeiði, útbúgving, lærupláss og møguleikar á arbeiðsmarknaðinum sum heild. Við kunning um yrkismøguleikar fáa fólk innlit í, hvussu tey koma fram at hesum møguleikum, og hetta stuðlar borgaranum í at taka týðandi avgerðir um framtíðar læring og/ella yrkisleið. Tað er týdningarmikið, at yrkiskunningin er álítandi og veruleikakend, so borgarin kann velja og leggja ætlanir, við støði í álítandi upplýsingum.

Atgongd til og førleikar at leita eftir, skilja og meta um yrkismøguleikar, eru avgerandi førleikar at hava, tá talan er um at fara undir útbúgving, luttaka og útinna avrik innan útbúgvingarøkið, eins og at vera partur av arbeiðsmarknaðinum. Hesir førleikar eru lyklaførleikar innan CMS. Ávísir bólkar í samfelagnum hava trupulleikar við at handhevja hesar førleikar, og tað er av stórum týdningi, at hesir fáa holla vegleiðing og hjálp til yrkiskunningina og tey val, teir ynskja at taka.

**Hvat er góð mannagongd**

Politikkur og skipanir, sum:

- kunna um yrkismøguleikar og tær KT-skipanir, sum verða nýttar til høvi eiga at vera brúkaravinarligar: uppseting, málburður, ljóð, grafikkur o.a. eiga at vera løtt at skilja, tilfarið eigur at vera námsfrøðiliga tillagað og atlit eiga at vera tikin til viðkomandi viðurskifti hjá sera ymiskum fólki. Havast má í huga, at tey, sum leita sær kunning, koma úr ymiskum sosialum mentanum, og kunningin um yrkismøguleikar eigur at hjálpa teimum á leið, soleiðis at tey kunnu lýsa sín egna tørv og seta sær sjálvum viðkomandi spurningar;
- upplýsingar eiga at vera neyvir, dagførdir og ikki-diskriminerandi. Eisini eigur kunningin um yrkismøguleikar at vera politisk óheft, eins og ávísar fyritøkur eiga ikki at hava framíhjárætt at koma við upplýsingum um seg sjálvar; og
- tá talan er um at savna og býta út upplýsingar um arbeiðsmarknaðin, eigur at vera virkað fyri samskipan ímillum ymiskar myndugleikar og viðkomandi áhugapartar í samfelagnum, t.d. politiskar myndugleikar, stovnar og felagsskapir.

**Núverandi støða**

Orsakað vantandi samskipan á vegleiðaraøkinum, er eingin felags kunning til borgarar í

Føroyum, sum stuðlar honum í at taka týðandi avgerðir í sambandi við læru- og yrkismøguleikar.

**Góð ráð til íverksetan**

Ymisku stovnarnir í samfelagnum, so sum skúlar (framhaldsdeildir og miðnámsskúlarnir), Arbeiðsloysisskipanin, Vinnuhúsið og fakfeløg eiga at menna eitt tættari samstarv enn tey hava í dag. Á henda hátt kunnu stovnarnir leiðbeina fólki á rætta stað at leita sær kunning um eitthvørt evni, sum tey hava áhuga í. T.d. um ein timburmaður fer til fakfelag sítt at kæra sína neyð tí hann ikki longur kann arbeiða sum timburmaður, men ynskir at fara undir víðari lesnað, so eigur fakfelagið at kenna vegleiðingarmøguleikarnar á miðnámsskúlunum og duga at vísa honum hagar hann kann fáa vegleiðing og meira kunning. Á hendan hátt kann vegleiðing hjálpa alt fleiri borgarum víðari á leið í lívinum.

### *Leiðregla 7: Útbúgving, læra og kvalifisering av vegleiðarum*

**Lýsing**

Grundútbúgving av vegleiðarum verður nomin á hægri lærustovni, sum byggjast kann viðari á við styttri og longri skeiðum. Útbúgvingin fevnir um vitan, evnir, førleikar, hugburð og bygnað innan LLV. Krøvini til skeið eru ymisk innan LLV-tænastur, alt eftir hvørjum øki og hvørjum borgarum vegleiðingin er ætlað.

**Hví er hetta týdningarmikið**

- Borgarar skulu kunna líta á, at LLV-tænasturnar verða veittar av vegleiðarum, ið hava útbúgving og førleikar at veita tænastuna, og sum arbeiða eftir etiskum forskriftum innan økið.
- Borgarar eiga at verða stuðlaðir í at gerast tilvitaðir um teirra tørv á LLV, fyri síðani at vera møttir av útbúnum vegleiðarum, har borgarin verður stuðlaður í at taka týðandi og munagóðar avgerðir um læru- og yrkisval.
- Sannlíkt er, at vegleiðarar, og onnur starvsfólk innan vegleiðing, megna betur at vegleiða borgarum í at taka góðar avgerðir um útbúgvingar- og yrkisætlanir, um vegleiðarin hevur fingið hóskandi upplæring og útbúgving.

- Útbúgving av vegleiðarum og øðrum starvsfólki, hækkar um støðið í vegleiðaratænastuni, og um støðið í tiltøkum kring vegleiðingina. Hetta førir við sær, at støðið og tilvitanin um vegleiðing sum heild hækkar, borgaranum og politisku skipanini at frama.

**Hvat er góð mannagongd**

Politikkur og skipanir, sum:

- taka støðið í at vegleiðing til føroyska borgaran er á dygdargóðum (professionellum) støði;
- tryggja framhaldandi útbúgvingar og eftirútbúgvingar innan vegleiðing;
- skipa fyri førleikametingum, soleiðis at einstaki borgarin fær viðurkent og førleikamett sínar arbeiðs- og lívsroyndir;
- gera etiskar leiðreglur, sum eisini fevna um atferð hjá vegleiðarum;
- fremja flytføri hjá vegleiðarum tvørtur um geirar, til dømis innan útbúgvingar, millum útbúgvingar, yrkisøkir og í samfelagnum sum heild;
- styrkja sambandið millum politisku fyriskipanina og starvsøkið innan vegleiðing; og
- sum tryggja, at vegleiðing í Føroyum miðvíst verður dagførd í mun til gongdina í altjóða og ES høpi.

**Núverandi støðan**

Sum nevnt í leiðreglu 3 vóru á sumri 2013 stig tikin til skeið í MA-Vegleiðing á Fróðskaparsetrinum. So útlit eru fyri, at vegleiðaratænastan kann góðskutryggjast og helst mennast í framtíðini.

**Góð ráð til íverksetan**

At vegleiðarar eru í holt við lestur í MA-vegleiðing, er eitt sig á rættari kós. Harafturat verður umráðandi, at Fróðskaparsetri miðvíst bjóðar skeiðið út aftur og frameftir eisini fer at bjóða út førleikamennandi skeið innan vegleiðing.

### *Leiðregla 8: Fígging av tænastuni lívlong vegleiðing.*

**Lýsing**

LLV í Føroyum kann fíggjast á ymiskan hátt. Landið og avvarðandi almennir stovnar kunnu veita beinleiðis fígging. Kommunur kunnu handa ávísum økjum ella stovnum fígging. Kommunur og stovnar kunnu sjálv útvega fígging. Privatir ella almennagagnligir og sjálvbodnir stovnar og fyritøkur kunnu veita fígging. Í øðrum londum eru dømi um, at almenni geirin og privati geirin býta fíggingina av økinum sínámillum. Eitt bland av omanfyristandandi er tí eisini ein møguleiki, og tá er samstarv og ábyrgdarbýti neyðugt.

**Hví er hetta týdningarmikið?**

Lívlong vegleiðing er gagnlig, bæði sum privatur og almennur ágóði. Vegleiðingin gevur týðandi førleikar í sambandi við samfelagslig mál innan útbúgving, yrkismenning, sosiala inklusión, og hon gagnar sum heild búskapinum. Eins og í øðrum evropiskum londum, eiga allir føroyskir borgarar at hava atgongd til lívlanga vegleiðing. Atgongd til lívlanga vegleiðing er ikki møgulig uttan almenna fígging. Viðvíkjandi sosialum sambondum, so sum javnstøðu millum kynini í sambandi við møguleikar og viðferð, eiga allir føroyskir borgarar at hava rætt til yrkisvegleiðing. Við almennari fígging, verður rætturin hjá borgaranum til lívlanga vegleiðing, sum ein tænasta, staðfestur. Henda leiðregla viðurkennir eisini, at privati geirin kann veita stuðul til útvegan av ymiskum tænastum og loysnum innan lívlanga vegleiðing.

**Hvat er góð mannagongd**

Politikkur og skipanir, sum:

- virka fyri, at nøktandi fígging verður veitt til vegleiðaraskipanina, til tiltøk, og til framleiðslu av kunningartilfarið, sum fremur rætt borgarans til yrkisvegleiðing og atgongd til hesa;
- taka ábyrgd av, hvussu fígging av vegleiðing verður ásett og verður nýtt;
- hava til viðgerðar spurningar viðvíkjandi at fullnýta fíggjarorkuna í sambandi við útvegan av tænastum og loysnum, so sum innanhýsis samskipan og samskipan millum skipanir og stovnar;
- stuðla vísindaligum kanningum, sum verða gjørdar av úrtøkuni og úrslitunum frá yrkisvegleiðingini;

- tryggja, at allar skipanir og stovnar, sum fáa almenna fígging til yrkisvegleiðing, liva upp til áður ásetta góðskustøði viðvíkjandi tænastum, loysnum, og í mun til hvørjir førleikar eiga at vera kravdir av vegleiðaranum;
- eggja privata geiranum, á hóskandi hátt, at gera íløgur í tænastur og loysnir, sum veita yrkisvegleiðing, ið er bygd á ásettar grundreglur fyri lívlangari vegleiðing, og sum fevna um alt landið; og
- á hóskandi hátt eggja til, at privati og almenni geirin arbeiða saman um at útvega yrkisvegleiðing til føroyska borgaran.

**Núverandi støðan**

Á miðnámsskúlunum hevur vegleiðaraskipan verið í mong ár, har miðnámsskúlanæmingar hava fingið vegleiðing í samband við skúlagongdina og vegleiðing um framhaldsútbúgvingar og yrkismøguleikar. Eisini finst skipað vegleiðing í fólkaskúlanum. Vegleiðaratænasturnar á skúlunum verða fíggjaðar av mentamálaráðnum.

Á privata arbeiðsmarknaðinum verður vegleiðing veitt borgarum í sambandi við arbeiðsloysi. Her er tað ALS-skipanin, sum "loftar" borgarnum. ALS-skipanin er tvungin inngjaldsskipan, sum allir lønmóttakarar gjalda í, og soleiðis fíggja.

**Góð ráð til íverksetan**

Kanningar gjørdar uttanlands vísa, at LLV er gagnlig bæði sum privatur og almennur ágóði. Vegleiðingin gevur týðandi førleikar í sambandi við samfelagslig mál innan útbúgving, yrkismenning, sosiala inklusión, og hon gagnar sum heild búskapinum. Harafturat vísa kanningarnar, at LLV gagnar samfelagnum fíggjarliga (sí leinkjur til leiðreglu 8).

## *Leiðregla 9: Kunningar- og samskiftistøkni*

**Lýsing**

Kunningar- og samskiftistøkni (KST) í lívlangari vegleiðing vísur til tænastur, undirstøðukervi og elektroniskt innihald, sum betrar um politikkin og skipanarmenningina av LLV og veiting av tænastum, tilfeingi og amboðum innan LLV. Víst verður til hvussu interaktivar tænastur, tilfeingi og amboð verða sniðgivin og ment til borgararnar, hvussu hesi kunnu gagnnýtast, tillagast og mennast. Víst verður eisini til talgilda førleikan hjá borgaranum, ið er neyðugur fyri at nýta KST í lívlangari vegleiðing.

KST í lívlangari vegleiðing kann hava fleiri ymiskar leiklutir. Tað kann:

- vera amboð til at hjálpa, styrkja og víðarimenna ta siðbundnu vegleiðingina og vegleiðarahættir og vera eitt alternativ til hesar siðbundnu hættir;
- takast inn í verandi vegleiðaratænastur og kann vera við til at broyta arbeiðsgongdir og býti av búskaparliga tilfeinginum til vegleiðing;
- vera eitt fyrisitingarligt amboð, sum stuðlar innsavnan og viðgerð av próvtilfari um vegleiðaratænastuna, sum økir innlit í og týdningin av vegleiðaratænastuni, og
- vera eitt samskiftisamboð, ið gevur møguleikar fyri felags kørmum og uppsetingum fyri tænastuni av lívlangari vegleiðing. Eitt amboð, sum kann virka tvørtur um ymiskar geirar (útbúgving, venjing, arbeiðsmarknað og sosiala geiran).

**Hví er hetta týdningarmikið?**

KST stuðlar undir eina borgararættaða tilgongd til almennar tænastur, t.d. innan LLV, og stuðlar undir, at tilfeingið og amboð gerast meira atkomilig hjá borgaranum.

KST gevur nýggjar møguleikar innan vegleiðing, har KST kann virka sum ein integreraður faktorur í menningini av politikki fyri vegleiðing í samband við lívlanga vegleiðing.

Atferðarbroyting hjá borgarum: KST-tænastur, infrakervið og elektroniska innihaldið hevur broytt atferðina hjá borgarum. Einstaklingar, bólkar og lokalsamfeløg vísa seg at vera kreativ í menning av nýggjum nýtslumøguleikum fyri KST-tænastum, sum er vorðin ein náttúrligur partur av vegleiðingini.

KST-amboðini geva øktan møguleika til sjálvhjálp og harvið verður atkomuleikin til vegleiðaratænastuna víðkaður, eitt nú við nýtslu av sosialum miðlum og mobilum eindum.

Nýtslan av KST í lívlangari vegleiðing krevur nýhugsan innan vegleiðaraøkið, og dagføring av fakligum førleikum. Her verður umráðandi við samskipan og samstarvi, soleiðis at avmarkaða tilfeingið, verður gagnnýtt á bestan hátt.

**Hvat er góð mannagongd**

Politikkir og skipanir, sum:

- stuðla undir, at KST í lívlangari vegleiðing skal vera ein partur av heildarætlanini fyri vegleiðing

- tryggja, at stjórnarráðini, sum hava felags ábyrgd av lívlangari vegleiðing, hava ein felags avtalaðan karm fyri leiklutin og nýtsluna av KST í lívlangari vegleiðing og samskifta hetta til allar veitarar og áhugabólkar

- fáa til vega neyðuga infrakervið til menning og íverksetan av KST tilfeingi, serliga innan útbúgving og stuðul til tænastuveitarar

- hækka tilvitið um etiskar spurningar (t.d. viðvíkjandi online-samleika og virðing fyri privatlívinum) og áseting av standardum í nýtslu og sniðgeving av framkomnari tøkni í LLV

- viðurkenna KST-førleikar hjá borgarum og góðtaka, at borgarar eru ymiskir. Veita serligan stuðul til vegleiðing, har tørvur er á hesum

- stuðla talgildu nýtsluni í lívlangari vegleiðing (sosial integratión, ið tryggjar at einstaklingar og veikari bólkar hava atgongd til neyðugu førleikarnir at nýta KST til lívlanga vegleiðing)

- stuðla undir, at samskift verður á ”vanligum talumáli”, har lívlong vegleiðing verður lýst, herundir eisini kunning um yrkismøguleikar gjøgnum KST

- skunda undir at borgarar fáa KST førleikar, fyri at kunna luttaka í online vegleiðingini

- integrera nýtsluna av KST í yrkisligu útbúgvingarskipanirnar fyri at hjálpa borgarum at menna sínar førleikar at meta um og nýta online-upplýsingar í samband við yrkismenning teirra

- stuðla undir nýtsluna av virtuellum pallum innan vegleiðing, har skipast kann fyri ymiskum vegleiðaratiltøkum

- skipa fyri førleikamenning av nýggjum og verandi vegleiðarum, fyri at dagføra hesar í at skilja frábrigdini í KST miðlinum og etisku spurningarnar, sum íkoma í sambandi við hesi. Integrera skipaða nýtslu av KST í verandi lívlangari vegleiðing

- menna standardar og mannagongdir innan vegleiðarayrki, har KST gerst eitt amboð í vegleiðingini
- fremja gransking og javnan eftirmeta nyttu og týdning av KST-nýtsluni í vegleiðingini.

**Núverandi støðan**

Hóast talgildu førleikarnar hjá føroyska borgaranum eru á miðal høgum stigi, kann ikki sigast, at vit eru komin serliga langt, tá tað snýr seg um at sniðgeva og menna interaktivar tænastur innan vegleiðing. Fyrispurningar umvegis teldupost er partur av dagliga arbeiðnum, ávísar tíðir á árinum verður latið upp fyri kjatti við vegleiðingina, og gjørdar hava verið onkrar royndir við e-vegleiðing.

**Góð ráð til íverksetan**

E-vegleiðing vinnur fram í grannalondunum, og kann hetta eisini vera ein partur av heilarætlanini fyri vegleiðing í Føroyum. Ein av fyrimununum við e-vegleiðingin er atkomuleikin fyri flestu borgarar, og vegleiðaratænastan kann veitast uttan fyri vanliga skrivstovutíð. Eitt nú hava miðmámsskúlarnir royndir við e-vegleiðing, tá søkt verður inn á skúlarnar. Bygt kann vera á hesar royndir, og tænastan kundi verið víðkað til aðrar tíðir av árinum eisini.

## 2.2 Leiðreglur fyri politikk og skipanir fyri lívlangari vegleiðing í útbúgvingarskipanini

### *Leiðregla 10: Lívlong vegleiðing fyri skúlanæmingar*

**Lýsing**

Vegleiðing fyri skúlanæmingar vísir til eina røð av námsfrøðiligum tænastum, skipaðum ætlanum og tiltøkum, ið stuðla næminginum at skilja læruleiðir og møguleikar innan skúlaverkið eftir lokna útbúgving og í arbeiðslívinum. Tey gerast før fyri at megna skiftið ímillum áður nevndu, umframt at taka CMS til sín. LLV hjálpir næmingum og familjum teirra at leggja ætlan fyri næsta stigið, serliga við skúlalok, tá lesandi skula taka týdningarmiklar avgerðir um framtíðar lesnað, læru ella arbeiði.

Partur av LLV veitingum er at veita stuðul til foreldur/verjar, lærarar og skúlaleiðslu at skilja læruleiðir og samanhang. LLV-tænastur til næmingar kunna veitast í skúlanum

ella á einari vegleiðarastovu. At taka avgerðir um útbúgving ella yrki er ein heildartilgongd, ið krevur, at næmingurin kritiskt kann taka støði bæði í sjálvsfatan og ávirkan uttanífrá. Skúlavegleiðarar eiga tískil at hava serliga námsfrøðiliga venjing innan karrieruvegleiðing.

**Hví er hetta týdningarmikið?**

Lyklamál fyri at skúli/útbúgving eydnast er næmingaluttøka og áhaldni, at næmingar eru motiveraðir og luttaka í læring og skapa úrslit, næmingurin mennist við og aftaná skúlagongd. Við at veita næmingum lærumøguleikar við brúgvabygging, harímillum arbeiði og læru, spælir LLV ein týðandi lut í fremjanini av námsætlan og førleikamálum.

Tað er stórur munur á, hvussu tann einstaki næmingurin megnar at síggja, taka avgerðir, gerast tilvitaður um og tulka upplýsingar viðvíkjandi sær sjálvum og framtíðar læru- og yrkismøguleikum, umframt væntanir frá familju, kenningum og samfelag. Neyðugt er tí at tillaga LLV til støði hjá einstaka næminginum.

Vitan hjá foreldrum, samfelag, vinum og lærarum um vinnulív og arbeiðsmarknað er avmarkað, eins og vitan teirra um viðkomandi læruleiðir. Hóskandi LLV aktivitetir undir skúlagongd kunna fremja førleikar teirra at hjálpa ungum at taka avgerðir í sambandi við læru, útbúgving og arbeiði.

Avgerðir, tiknar tíðliga í skúla-/lærutilgongdini, hava týðandi ávirkan á avgerðir, ið verða tiknar seinni. Tí er altumráðandi, at næmingar og foreldur fáa LLV so tíðliga sum til ber.

Munadygg LLV tryggjar gagnliga nýtslu av almennum játtanum og minkar um kostnaðin av fráfalli.

LLV stuðul er neyðugur fyri at hjálpa ungum, foreldrum og lærarum at megna óvæntaðar fylgjur av avmarkandi valum.

Útbúgvingarskipanir hava sum uppgávu at veita næmingum "lyklaførleikar fyri LLL", serliga "at læra at læra", fyri at motivera og fremja eydnaða læring umframt flytføri, er veiting av vegleiðing avgerandi í víðfevndum ætlanum mótvegis fráfalli. Sum lýst av Conucil Recommendation (2011): fyribyrging, intervisión og kompensatión.

**Hvat er góð mannagongd?**

Politikkir og skipanir, sum:

- stuðla umfatandi tilgongd hjá næmingunum til karrierulæru og samanfata karrierufrálæruætlanir innan námsætlanina, upplivingarlæru, starvslæru í samfelagnum og tilfeingi við fyrrverandi næmingum, telefon og netið, umframt einstaklinga- og bólkavegleiðing
- fremja karrierulæru og CMS í námsætlanum við atliti til ymiskleikan hjá tí einstaka og bólkinum og førleika teirra um at vera tilvitað, tulka, eftirmeta og nýta karrieruvitan – eisini hana, ið finnst á alnótini og á sosialu miðlunum
- menna umfatandi lærutilgongd innan CMS og íverksetanarførleikar í øllum árgangum í fólkaskúlanum;
- fremja umfatandi LLV ætlan í og uttan fyri skúlan, ið stuðlar næmingum, foreldrum og skúlaleiðslu, tá avgerðir verða tiknar um skúla og arbeiði
- veita serstakan vegleiðingar- og ráðgevingarstuðul til næmingar, sum eru í vanda fyri at fara úr skúlanum í ótíð, serliga við at eggja teimum við CMS-námsætlan og við at ogna sær grundleggjandi førleikar at nýta tænastur á alnótini
- stuðla og menna bæði nýbyrjaðar og vandar vegleiðarar, aðrar starvsfelagar í skúlanum, ið veita vegleiðing, og skúlaleiðslu. Serliga tá hugsað verður um CMS-læru og meting, umframt læruhættir, sum fyribyrgja, at næmingar gevast áðrenn teir eru lidnir
- hóskandi stuðla tí, ið fær til vega nýtulig ráð til skúlaleiðslur, so at tær kunnu veita munagóða LLV-tænastur
- fremja samsvar í góðskuni av LLV tvørtur um skúlar og øki, har ábyrgdin og fíggingin til hetta er latin upp í hendurnar á kommunum og landi
- savna tilfar um frálæruna, starvsvenjingar og arbeiðsstøð/-pláss fyri fráfarnar næmingar, harumframt tekniskt at tryggja sporføri (uppgáva fyri Hagstovu Føroya)

**Núverandi støðan í fólkaskúlanum**

Tíð til vegleiðing: Til hvønn næming í 6. – 10. fl. verða latnir 1,24 klokkutímar fyri hvønn næming í 7. – 10. flokki um árið. Tíðin til skúlavegleiðing verður býtt millum

undirvísingartímar og tímar til fyrisiting í lutfallinum 4/5 til undirvísing og 1/5 til fyrisiting.

Vegleiðaraútbúgvingar: Sum nú er, eru 3 ymisk sløg av útbúgving fyri vegleiðarar í fólkaskúlanum. Tann fyrsta, ið bert fólkaskúlalærarar fingu, so tann kombineraða millum fólkaskúla og lestarvegleiðarar og so tey, sum í dag hava diplom útbúgvinging í vegleiðing.

Vegleiðaraumstøður: Smb. "Kunngerðini um skúlavegleiðing" (Lógasavnið, 2016), so eigur skúlavegleiðarin at hava egna skrivstovu, har til ber at hava samrøður og aðra vegleiðing. Bólkavegleiðing kann sjálvandi eisini havast í øðrum hóskandi hølum.

**Góð ráð til íverksetan av lívlangari vegleiðing fyri skúlanæmingar**

Ynskiligt er í fyrstu atløgu, at fleiri tímar verða veittir til vegleiðing í fólkaskúlanum og at bert útbúnir vegleiðarar veita vegleiðing, tí vegleiðing fevnir um so stórt øki, at útbúgving innan vegleiðing er neyðug. Í aðru atløgu er ynskiligt, at LLV verður veitt øllum næmingum frá fyrsta flokki, og í triðju atløgu, at næmingarnir fáa "lyklaførleikar fyri lívlangari læru," LLL, við serligum denti á "at læra at læra."

### *Leiðregla 11: Lívlong vegleiðing fyri yrkisútbúgvingarøkið*

**Lýsing**

Vegleiðing fyri yrksiútbúgvingarnar kann býtast upp í 3 stig, sum eisini er lýst í ELGPN skjalinum (ELGPN, 2015). Tað, sum í skjalinum verður rópt IVET (Initial Vocational Education Training), kann á føroyskum nevnast Byrjunar-Yrskisútbúgvingar-Læra, BYÚL. Tað, sum verður nevnt VET (Vocational Educational Training), kann nevnast Yrkis-Útbúgvingar-Læra, YÚL, og tað, ið verður nevnt CVET (Continuing Vocational Educational Training), kann á føroyskum verða nevnt Framhaldandi-Yrkisútbúgvingar-Læra, FYÚL.

Kunningin á fólkaskúlastigi eigur í størri mun enn nú at fevna um yrkisútbúgvingarmøguleikarnar. Byrjunar yrkisútbúgvingarlæran (BYÚL) eigur at fevna um eina breiða kunning og verkligar royndir innan tær ymisku yrkisgreinarnar, t.e. bæði tær, sum standa í boði í Føroyum og uttanlanda. At síggja og royna í verki ymisku yrkisleiðirnar fyri at tryggja, at næmingar kunna taka støðu og velja á nóg breiðum grundarlagi, má verða fremst í huga fyri hendan aldursbólk.

Fyri Yrksiútbúgvingarlærlingarnar (YÚL) eigur vegleiðingin at leggja dent á kunning og ráðgeving í royndunum at kanna og uppliva tey ymisku yrkini og at stuðla lærlingunum í at kanna møguleikarnar fyri læripláss og yrkisútbúgvingar-lestrar/venjingar ætlanir. Kunning um framtíðar møguleikar innan yrskiútbúgvingarnar og at hjálpa og stuðla lærlinginum í at seta fyrispurningar og umsóknir eigur eisini at vera ein partur av vegleiðingini.

Fyri Framhaldandi yrkisútbúgvingar lærlingar (FYÚL) hava framtíðarmøguleikar innan yrki týdning, antin sum arbeiðstakarar ella sum framhaldandi útbúgving innan valdu yrkisútbúgving. Hesin bólkur kann hava sum mál at førleikamenna seg og/ella byggja víðari uppá sína útbúgving. Vegleiðingin fyri hendan bólkin eigur at snúgva seg um validering av førleikum og kunning og vegleiðing í hvørjir møguleikar eru fyri framman.

Ein bólkur, ið oftani er gloymdur, eru borgarar, ið hava ymiskar yrkisroyndir, men ikki hava viðurkend prógv fyri sínar førleikar. Fyri hendan bólkin eigur at verða sett á stovn ein *førleikametingaskipan*, ið kann hjálpa hesum borgarum at fáa førleikar sínar viðurkendar, soleiðis at teir kunna verða settir á rætt lønarstig og fyri at geva teimum møguleika at fáa sær framhaldsútbúgving. Vegleiðingin má verða grundað á viðurkendar mannagongdir fyri førleikameting fyri hendan bólkin.

**Hví er hetta týdningarmikið?**

Tað er sannlíkt, at miðnám er ikki rætta útbúgvingin fyri øll. Ein partur av teim lesandi á miðnámi eru ikki har grundað á egið val, men fylgja rákinum. Tey hava valt miðnám, tí foreldur teirra eggja teimum til tað, ella tí, at vinfólk teirra hava valt miðnám. Trupult er at prógva pástandin, men fráfallstølini á miðnámi og royndirnar frá fleiri lærarum á miðnámi, undirbyggja pástandin um, at miðnám ikki er fyri øll. Kunningin um útbúgvingarmøguleikar aftan á fólkaskúlan er ikki nóg fullfíggjað og ov víðfevnd til, at næmingarnar kunna velja eftir royndum og vitan um møguleikarnar.

Politiska málið um, at øll skulu ígjøgnum miðnám (Mál at fremja - Fylgiskjal til samgonguskjalið millum Javnaðarflokkin, Tjóðveldi og Framsókn , 2015, s. 4) er ein forðing fyri at menna møguleikarnar og tilboðini á yrkisútbúgvningarøkinum. Hóast málið allarhelst skal skiljast sum, at málið er, at øll ung skulu fáa eina úbúgving aftan á fólkaskúlan, so verður hetta oftast skilt sum, at øll skulu hava eina gymanasiala

útbúgving. Eggjanin frá samfelagnum um, at øll skulu gjøgnum miðnám ekskluderar og niðurraðfestur yrkisøkið, soleiðis at færri velja hesa leið, hóast tey kansku kundu hugsa sær hana.

Fyri teir fólkaskúlanæmingarnar, har miðnám ikki er rætta valið, og fyri fráfalnar næmingar frá miðnámi, hevur tað týdning at menna og uppraðfesta kunningina og vegleiðingina um yrkisútbúgvingar. Samstundis má tað verða ein samfelagslig skylda, at næmingarnar fáa so breiða og fullfíggjaða vegleiðing, kunning og royndir sum til ber, soleiðis at teir kunna gera verulig val, til gagns fyri tey sjálv og samfelagið.

Føroyska arbeiðsmegin hevur søguliga prógvað, at hon er serstakliga flytfør, og yrkismøguleikarnir, antin t.e. í Føroyum ella uttanlanda, eru aloftast góðir. Í ávísum tíðarskeiðum ávirka tey búskaparliga sveiggini eftirspurningin eftir arbeiðsmegi so nógv, at føroyska samfelagið hevur trot á arbeiðsmegi innan ávísar yrskisgreinar. Tí hava yrkisútbúgvingarnar eisini stóran samfelagsligan týdning.

At kunna um og vegleiða um møguleikarnar innan yrksiútbúgvingar økið er til gagns fyri tann einstaka, ið tá kann velja útbúgvingarleið sína á betri grundarlagi og til gagns fyri samfelagið, ið fær eina vælútbúna arbeiðsmegi.

**Hvat er góð mannagongd?**

Umráðandi er at styrkja og menna eitt tættari samstarv millum MMR (MMR, 2015), UVMR (UVMR, 2015), AMR (AMR, 2016), Vinnuhúsið (Vinnuhúsið, 2015) og Samtak (Samtak, 2015). Áhugapartarnir mugu stuðla og taka undir við kunning og vegleiðing um yrkisútbúgvingarøki sum eins týdningarmiklar yrkisleiðir og aðrar. Málbólkarnar eru bæði fólkaskúlanæmingar, ið standa fyri at velja útbúgving, og fyri tilkomnar borgarar, ið hava nýggjar karrieruleiðir í hyggju.

Yrkisdepilin hevur arbeitt við uppskoti um at seta á stovn ein depil fyri arbeiðsmarknaðin, har partarnir verða savnaðir til ein arbeiðsmarknaðardepil (Yrkisdepilin, 2016). Hetta uppskot kundi verið tikið framaftur, ment og útbygt til eisini at umfata eina yrkisvegleiðara- og ráðgevaradeild, sum so verður eitt sambindingarlið og samskiftislið millum vinnugeiran og útbúgvingargeiran.

**Núverandi støðan**

Í dag er eitt ávíst fráfall frá miðnámi í Føroyum. Sum áður nevnt er fatanin hjá nógvum

lærarum, at summir næmingar fara á miðnám tí tað er vorðið siðvenja, tí vinfólk fara, tí foreldur vænta tað, og tí tey ikki vita hvat tey annars skulu royna.

Varhugin er, at nógv ung ikki vita nóg nógv um tey handaligu fakini, ið kunnu veljast. Praktikktíðin í fólkaskúlanum, ið vanliga er 14 dagar í 9. og/ella 10. flokki, gevur einans avmarkaðar møguleikar at royna seg innan ymiskar yrkisgreinar. Ynskiligt er, at hendan praktikktíðin verður víðkað soleiðis, at næmingar fáa eitt betri grundarlag at taka støðu til útbúgvingval aftaná fólkaskúlan.

Nám X er eitt dømi um at geva fólkaskúlanæmingum ein møguleika at royna seg innan øki, ið annars ikki eru vanlig í fólkaskúlanum og á miðnámi.

Í grannalondum okkara hava tey ungu, ið eru liðug við fólkaskúlan, møguleika at fara á eftirskúla ella háskúla. Hesir skúlar geva teimum ungu møguleika at brúka eitt ár at royna seg innan øki, sum tey sjálv hava valt og antin brenna fyri, ella eru forvitin um, og kunnu tey soleiðis gera sær royndir, sum kunnu hjálpa teimum at velja yrkis- og útbúgvingarleið framyvir.

Í grannalondum okkara hava tey eisini eina sokallaða *portfolioskipan*, har næmingurin hevur royndir sínar savnaðar í skjølum ella mappum soleiðis, at næmingurin sjálvur gerst tilvitaður um sínar styrkir og veikleikar. Ein portfolioskipan kann eisini vera ein hjálp fyri lestrar- og karrieruvegleiðarar at hjálpa næmingum fram á leið.

Nógvir tilkomnir føroyingar hava royndir innan handaligu vinnurnar, uttan at teir hava eitt prógv, ið sigur, hvørjir teirra førleikar eru. Bæði innan handverk og fiskivinnu eru fólk, ið hava starvast alt sítt lív og sostatt kunna gera nógv ymiskt við hondum sínum. Eisini eru nógvar kvinnur, ið hava royndir í handarbeiði, matgerð, ansing og røkt, ið sum nú er ikki kunnu setast á eitt førleikaprógv.

Tørvur er soleiðis á, at hesir bólkar, um teir hava hug og tørv á at verða *førleikamettir*, fáa møguleika at brúka síni evni til at halda fram innan teirra áhugaøki, ella kunnu byrja eina útbúgving við einari førleikameting sum grundarlagi.

**Góð ráð til íverksetan fyri yrkisútbúgvingarøkið**

Í fyrstu atløgu mæla vit til at byggja brýr millum fólkaskúla, miðnámsskúla og vinnuligar yrkisfelagsskapir, við vegleiðarum sum fyriskiparum og samskiparum, fyri

at stimbra yrkisroyndir. Í næstu atløgu mæla vit til at víðka og menna praktikktíðina í fólkaskúlanum. Vit mæla til at seta á stovn eftirskúlar og háskúlar, har borgarar kunnu kanna og menna síni evnir. Hesi tilboð eru í lodunum kring okkum, og fyri at geva føroyskum ungdómi javnbjóðis møguleikar áttu líknandi tilboð at verið fyri føroyskan ungdóm. Portfolio- ella logbókskipan stuðlar undir sjálvstilvitan og kunning í sambandi við vegleiðing. At enda mæla vit til at skipa førleikameting og validering av borgarum við yrkisroyndum og handaligum royndum frá einum fjølbroytum arbeiðslívi.

### *Leiðregla 12: Lívlong vegleiðing fyri hægri útbúgvingar*

**LLV fyri lesandi innan hægri lestur**

LLV innan hægri lestur fevnir um at vegleiða studentum á universiteti. Hetta umfatar at vegleiða studentinum at finna tað best hóskandi økið at lesa í, og at læra at eyðmerkja teir eginleikar og amboð, ið hava týdning, um lesturin skal verða væl eydnaður. Annað, ið hevur týdning, er at veita kunning og læra studentin um tey stigini, ið studenturin skal ígjøgnum í lestrartíðini. Tað er eisini av stórum týdningi, at studentar læra at kenna hvørjar eginleikar, lesturin gevur teimum, og hvussu tey kunna brúka hesar eginleikar í arbeiðslívinum. Ein annar vinkul á hetta er, at læra studentin at fara í djúpdina í sínum lestri og læra, hvussu tey kunna brúka lesturin í samfelagnum.

**At menna seg til hægri lestur**

Menningin hjá einum studenti til hægri lestur má byrja, áðrenn studenturin kemur á eitt universitet. Ein fyrimyndarlig gongd hevði verið at ment eina brúgv millum vegleiðing á ymiskum lestrarstovnum. Hugsanini her er, at universitetið veitir kunning um teir ymisku møguleikarnar, meðan miðnámsstovnurin veitur førleikamenningina. Tá ið ein studentur byrjar universitetslesnað, tekur tann stovnurin yvir førleikamenningina.

**Gagnnýta eginleikar á arbeiðismarknaðinum**

Hóast hetta er nakað, ið skal mennast gjøgnum alla útbúgvingarskipanina, so er hetta avgjørt nakað, ið hægri lestrarstovnar skula leggja dent á eisini. Tað hevur týdning, at studenturin lærir at kenna teir eginleikar, ið lestrargongdin veitir, og hvussu hesir eginleikar kunna tæna arbeiðsmarknaðinum. Hetta kann m.a. verða gjørt gjøgnum uppgávuarbeiði ella starvsvenjing, ið verður partur av pensum. Aðrir møguleikar eru at veita vegleiðing, har endamáli er at staðfesta eginleikar og royndir og gjøgnum tað skapa eitt CV, ið kann hjálpa studentinum at síggja framtíðar møguleikar.

**At fara í dýpdina**

At eggja og hjálpa studentinum at fara í dýpdina í evninum er ikki bert fyri at eggja studentinum til lesturin, men eisini fyri at læra studentin at seta teori og praksis saman. Eisini er tað at síggja teoriina í samfelagnum og læra at síggja líkheitina. At styrkja hin lesandi innan hetta økið, styrkir ikki bert um lesturin, men hjálpir eisini studentinum at síggja, hvussu lesturin kann brúkast á arbeiðsmarknaðinum.

**Ein góð tilgongd**

Lesandi eiga, áðrenn tey koma til universitetið, at vera kunnað um møguleikar viðvíkjandi øllum teimum mongu yrkisleiðum, ið universitetslesnaður kann lata upp fyri.

Týdningarmikið er, at tílík kunning ikki bert verður stílað soleiðis, at tær bert fortelja um innihald í fakum innan eina ávísa útbúgving, men kunningin skal læra tann lesandi um hvat gagn, hesar universitets útbúgvingarnar kunna geva einum samfelag og ikki minst einstaklinginum sjálvum.

Hetta vil gera tann lesandi føran fyri, er at velja sína lívsleið meiri nágreiniliga, samsvarandi egnum áhugamálum og at taka nýggju vitanina til sín við eini betri fatan av hesum og hervið vera betur førur fyri at brúka vitanina.

Tað er týdningarmikið at læra tann lesandi at finna sær ein sunnan og úrslitagóðan arbeiðshátt, at veita hjálp til at finna munagóðar stuðulsskipanir (study support programs). Aftrat hesum er eisini týdningarmikið, at lesandi læra at leita sær fram lesitilfar, ið hevur tilknýtið til lesturin.

Alt hetta hevur týdning fyri at gera tilgongdina frá næmingi til lesandi so smidliga sum møguligt.

Tað hevur stóran týdning, at tann lesandi altíð hevur atgongd til vegleiðing, bæði um lestrarviðurskifti og viðurskifti uttanfyri lesturin. Vísur tað seg, at viðurskifti tann lesandi leggur fram, eru uttanfyri arbeiðsumráði hjá vegleiðarunum, so eigur stovnurin at hava samband við skikkaða hjálp.

Onnur evni, ið eisini hava týdning, eru bólkar ella skipanir, ið kunna stuðla lesandi, ið líða av angist m.a. fyri próvtøkum. Skipanir, ið kunnu menna tann lesandi viðvíkjandi lestrarførleika, t.e. m.a. at skriva, at lesa, at savna sær vitan og at samskipa.

Lesandi eiga at vera kunnað um yvirbygningarmøguleikar á verandi útbúgving teirra og eiga at fáa vegleiðing at velja røttu fak, skuldi tað verið fyri neyðini, t.d. um hetta skal opna fyri møguleikanum til ein ávísan yvirbygnað.

Lesandi, ið nærkast endanum á lestrinum, eiga at fáa kunning um krøv og møguleikar. Øll lesandi eiga at hava rættin til ein mentor, ið er tilknýttur evninum, sum verður valt til endaligu uppgávuna - ein mentor eigur at vera ein professionellur, við útbúgving, ið kann vegleiða í valda evninum.

**Hví er hetta týdningarmikið?**

Ein tílík skipan kann hjálpa at skapa ein vælvirkandi lestrarstovn, sum ikki bert veitir útbúgving, men eisini vegleiðir í tillagingartíðini frá byrjanini á universitetinum til farið verður á arbeiðsmarknaðin. Afturat hesum kann hugsast, at økt vitan um lestrarmøguleikar og um hvussu lesturin kann gagnnýtast á arbeiðsmarknaðinum, kann stuðla uppundir at halda studentinum til, so tað ikki endar við fráfalli í úrtíð. Annað, ið kann vera til gagns fyri stovn og samfelag, er, at tað kann minkast um arbeiðsloysi eftir lokna útbúgving, orsakað av, at studenturin hevur víðari sjónarvinkul, tá ið hugt verður at arbeiðsmarknaðinum. Hetta tí, at studenturin kennir sínar eginleikar og dugir at síggja, hvar og hvussu teir kunnu nýtast á arbeiðsmarknaðinum.

Lestrarstovnurin hevur eisini tann fyrimun, at ein studentur, ið fær vegleiðing og hjálp, tá ið tað er fyri neyðini, hevur betri møguleikar at koma víðari úr tungari tíð undir lestrartíðini, sum annars hevði kunna steðga lestrinum í úrtíð.

**Støðan á Fróðskaparsetrinum í dag**

Støðan hjá Fróðskaparsetrinum í dag er tann, at allar deildir ikki hava somu tilboð til tann lesandi viðvíkjandi vegleiðing. Tað er ikki fastsettur vegleiðara á øllum deildum, og tískil er støðan soleiðis, at tað kann vera ymiskt, hvussu nógv tíð kann vera givin hinum einstaka lesandi frá deild til deild.

**Góð ráð til íverksetan**

Tað er tó heldur ikki soleiðis, at hvør deildin hevur brúk fyri júst tí sama. Vegleiðingin á hvørjari deild má tillagast tørvinum hjá teimum lesandi, ið hoyra deildunum til. Hugsast má um, at onkrar útbúgvingar er rættaðar eftir ávísum starvi, har tað altíð er greitt, hvat tann lesandi fer at gera eftir loknan lestur, meðan aðrar útbúgvingar eru meiri víðfevnandi, tá ið tað kemur til starvsetan eftir loknan lestur. Tá ið støðan er sum tann seinna, kann tað hugsast,

at lesandi hava størri tørv á vegleiðing viðvíkjandi starvsmøguleikum, tá ið endin á lestrartíðini nærkast.

Ein góð byrjan fyri Fróðskaparsetrið hevði verið at lyft allar deildir upp á sama støði viðvíkjandi vegleiðing. Tað merkir, at nóg nógv tíð var til m.a. trivnaðarsamrøður á øllum deildum, at øll lesandi vóru rætt móttikin við lestrarbyrjan, so at lestrartíðin kann fáa eina hóskandi byrjan, at tað bleiv sett meiri orka av til at fylgja tí einstaka lesandi, soleiðis at møguligar seinkingar í lestrinum kundu verið rættaðar, fyrr heldur enn seinni. Eftir tað kundi hvør einstøk deild tillaga sína vegleiðing eftir tørvi, soleiðis at tað hóskaði teimum lesandi á hvørjari einstakari deild best.

### *Leiðregla 13: lívlang læring og vegleiðing fyri tilkomnar samfelagsborgarar*

**Lýsing**

Vaksnamannalæring er ein týðandi partur av hugtakinum *lívlangari-læring* og fevnir um almenna læring, yrkislæring og venjing, sum tilkomin taka lut í aftan á grundútbúgving. Hon fevnir um:

- formliga, ikki-formliga og óformliga læring fyri at dagføra, bøta um ella menna grundførleikar, ogna sær nýggjar førleikar ella førleikamenna seg til arbeiðsmarknaðin
- at luttaka í sosialari, mentanarligari, listarligari og samfelagsligari læring fyri at stuðla persónligari sjálvsmenning

LLV í vaksnamannalæring vísir til virksemi og tiltøk, ið gera tilkomnar samfelagborgarar førar fyri at taka upp og luttaka í læring, og har tað er hóskandi, menna førleikar til møgulig yrkisskifti.

Vegleiðingin snýr seg um validering og eyðmerking av ikki-formligari og óformligari læring. Vegleiðingin kann fara fram sum felagsvegleiðing, sum t.d. flokksvegleiðing ella persónlig vegleiðing, og/ella net- ella telefonvegleiðing. Vegleiðararnir kunnu vera serkønir karrieruvegleiðarar ella vegleiðarar við øðrum viðkomandi førleikum.

**Hví er hetta týdningarmikið?**

- At útvega lívlanga vegleiðing er ein partur av ætlanini um *lívlanga læring*. Vegleiðingin hevur alstóran týdning, tá tað snýr seg um at røkka tilkomnum

samfelagborgarum fyri at birta uppundir vaksnamannlæring og at veita kunning saman við tiltøkum, ið røkka hesar samfelagsborgarar soleiðis, at teir gerast tilvitaðir um tilboð og møguleikar, bæði tá ið umræður vanliga læring og fjarlestur.

- Fyri hendan bólkin eru tíðirnar broyttar og læringsmøguleikarnar eru heilt øðrvísi enn tá tey tóku sína grundútbúgving. Nøkur størv og yrkir eru ikki til longur og nýggj eru komin. Summir samfelagsgeirar eru minkaðir í tali av arbeiðsplássum, t.d. fiskivinnan, meðan aðrir geirar hava ment seg, t.d. KT-vinnan. Nýggjar leiðir innan læring og útbúgving eru mentar og hetta letur upp fyri nýggjum møguleikum. Hetta kann vera ørkymlandi fyri tilkomna samfelagsborgaran og tí er serkøn vegleiðing av stórum týdningi fyri at gera hendan bólkin tilvitaðan um hesar møguleikar.
- Hesin bólkurin er ikki ein homogenur bólkur. Summi hava royndir frá skúlaverkinum, onnur hava nógvar óformligar ella ikki-formligar førleikar, sum mugu viðurkennast, og nógv hava ringar royndir av at ikki vera viðurkend. Fyri hendan bólkin er vegleiðing og stuðul av serligum týdningi fyri at birta uppundir framhaldandi læring.
- Tilkomni samfelagborgarin er oftani í tí støðu at hann/hon hevur nógvar ymiskar leiklutir og skyldir. Familjuviðurskifti, fíggjarligar og sosialar umstøður kunna verða forðing fyri taka stig til broyting, men eisni kann hugsast at somu viðurskifti kunnu íbirta til framtak. Fyri hendan bólkin kann serkøn vegleiðing hava stóran týdning fyri at tey kunna síggja hvat er møguligt og hóskiligt til teirra tørv fyri at velja nýtt yrki.
- At luttaka í læring og útbúgving kann hava stóran fíggjarligan týdning fyri tilkomna samfelagsborgaran. At taka skilagóðar avgerðir, sum eru stuðlaðar av ráðgeving og vegleiðing kann stuðla uppundir at taka avgerðir innan læring og útbúgving, sum eru fíggjarliga gagnligar fyri borgaran.
- Vegleiðingin kann stuðla vaksnamannalæring og harvið geva eitt týðandi íkast til sosiala inklusión og persónliga menning.
- Fyri at styrkja kappingarføri hjá arbeiðsmegini í ES, má vaksmamannalæringin økjast við 15% fram til 2020, verður sagt. Um vit somuleiðis ætla at økja um lívlanga læring og harvið vaksnamannalæring í Føroyum fyri at styrkja um kappingarføri hjá føroysku arbeiðsmegini, so verður LLV av alstórum týdningi fyri at røkka einum slíkum máli. Tilkomni samfelagsborgarin er ofta ikki tilvitaður um teir møguleikar, ið eru tøkir fyri at ogna sær útbúgving og læring, serliga ikki um fjarlestur.

**Hvat er góð mannagongd?**

Politikkur og skipanir, sum:

- stuðla kunningar- og vegleiðingartænastum innan øll øki, t.d. gjøgnum internet, telefon og persónliga vegleiðing
- veitir persónliga vegleiðing
- útvegar vegleiðing, har vaksnamannlæringin fer fram í skúlum og á skeiðum
- stuðla uppundir validering og viðurkenning av formligari, ikki-formligari og óformligari útbúgving
- fremja yrkis- og vinnuroyndir sum royndargrundaða karrieruútbúgving
- leggja serligan dent á bólkar, ið hava serligan tørv á vegleiðing, t.d. 1) tey, ið fóru tíðliga úr fólkaskúlan, 2) ung, ið onga útbúgving hava, 3) langtíðararbeiðsleys og 4) vaksin, sum ikki hava neyðugar førleikar førleikar og mugu hava stuðul til at taka lut í einum arbeiðsmarknaði, ið er merktur av stórum samfelagsligum broytingum
- stuðla marknaðarføringini av lívlangari læring og útbúgving innan allar miðlar
- stuðla menningini av CMS soleiðis, at samfelagsborgarin kann standa seg í teimum avbjóðingum, sum tey standa fyri í einum skjóttbroytiligum heimi
- stuðla vegleiðarayrkinum soleiðis, at vegleiðingin kann fara fram innan tey øki, ið hava við vaksnamannalæring og útbúgving at gera
- tryggja, at karrieruvegleiðing er ein fastur partur av vaksnamannalæring á øllum almennum stovnum har læring fer fram
- stuðla samstarvi millum fyritøkur, arbeiðarfeløg, arbeiðsgevarfeløg, ALS og almennar stovnar fyri at fremja atgeingi til vaksnamannalæring, undir hesum eisini lívlangari læring, t.d. við viðkomandi kunningartilfari um LLL.

**Núverandi støðan**

Fyri tilkomna samfelagsborgaran eru tilboð og møguleikar fyri framhaldandi læring avmarkaði. Kvøldskúlasskipanir har ein kan skriva seg inn til ymisk skeið verða tó bjóðaði út í summum kommunum. Men bæði fyri tann borgaran, ið nærkast endanum av sínum verkliga arbeiðslívið og fyri tey, sum eru farin frá, kann tað vera ein avbjóðing at sleppa at brúka og menna teir førleikar, ið ein hevur ogna sær gjøgnum eitt langt arbeiðslív. Allir poltiskir flokkar eru samdir um at vit í framtíðini mugu hækka pensjónaldurin, bæði tí fólk generelt eru betri fyri og gerast eldri, men eisini tí at vit samfelagsbúskaparliga mugu eggja fólki til at vera longri á arbeiðsmarknaðinum fyri at kunna fíggja framtíðar vælferðarsamfelagið. Men er samfelagið til reiðar til at stuðla gráa gullinum í at menna sínar førleikar við øktum tilboðum í lívlangari læring? Tað er sera ivasamt.

**Góð ráð til íverksetan**

Gera eina støðulýsing av tørvinum eftir tilboðum um framhaldandi útbúgving /læring millum tilkomnar samfelagsborgarar. Ein kan sum útgangsstøði spyrja borgaran um “hvussu kann lívið gerast innihaldsríkt fyri tilkomna samfelagsborgaran og hvat má gerast fyri at røkka málinum?”

Neyðugt er at útbúgva starvsfólk, ið eru før fyri at førleikameta samfelagsborgarar og hava førleikar í at vegleiða borgarar við serstøkum tørvi. Hetta krevur fólk við vegleiðaraútbúgving.

## 2.3 Leiðreglur fyri politikk og skipanir fyri lívlangari vegleiðing á yrkis- og eldraøkinum í útbúgvingarskipanini

### *Leiðregla 14: Lívlong vegleiðing fyri starvsfólk*

**Lýsing**

Lívlong vegleiðing, LLV, eigur at fevna um starvsfólk á øllum økjum. LLV til starvsfólk snýr seg um eina rúgvu av virksemi, ið kann bøta og geva arbeiðsstøðu teirra innihald. LLV eigur at geva starvsfólkum eina framtíðarmenningarætlan, ið fevnir m.a um framhaldandi menning, arbeiðsskifti og fráferð vegna aldur.

**Hví er hetta týdningarmikið?**

LLV eigur at vera veitt á arbeiðsplássinum, sum ein náttúrligur partur av HR menningarætlanini hjá arbeiðsplássinum. LLV kann eisini vera partur av trivnaðarætlanini hjá arbeiðsplássinum – tí LLV veitir betri trivnað og arbeiðsgleði.

**Hvat er góð mannagongd?**

Vegleiðarar við MA-útbúgving eiga at veita slíka vegleiðing. Hendan vegleiðingin kann fáast í lag umvegis HR starvsfólk við vegleiðaraútbúgving, fakfelagið, vegleiðaramiðstøðina, ALS ella privatar veitarar.

Ynskiligt er at veita hesa vegleiðing til øll starvfólk á arbeiðsplássinum. Tó kunnu hesi starvsfólk hava serligan tørv:

- Starvsfólk, ið hava tørv á persónligari menning
- Starvsfólk, ið hava tørv á fakligari menning

- Starvsfólk, ið leita sær nýggjar avbjóðingar á arbeiðsplássinum, á virkjum, stovnum o.ø.
- Starvsfólk, ið skulu skifta øki á arbeiðsplássinum
- Starvsfólk, ið skjótt skulu frá vegna aldur

LLV hevur stóran týdning fyri starvsfólkini og arbeiðsgevaran.

Starvsfólkini kunnu bøta um førleika sín. Tey kunnu umvegis vegleiðing fáa venjingar og sjálvsmenning. Tey kunnu verða førleikamett.

Arbeiðsgevarin fær starvsfólk við betri førleikum. Tey vera glaðari og meiri motiveraði. Arbeiðsgevarin fær nøgdari starvsfólk og meira produktivitet í starvshópinum. Arbeiðsgevarin fær eisini, umvegis LLV, eitt gott amboð til HR menning og fær við hesum eina lættari leið til menning av starvsfólkunum.

**Núverandi støðan**

Tað er ymiskt, hvussu stovnar og fyritøkur veita LLV í Føroyum. Summar fyritøkur veita starvsfólkasamrøður eina ferð um árið. Summi veita bólkavegleiðing/samrøður, ímeðan onnur veita "ein-til-ein" samrøður. Tó eru sera nógv arbeiðspláss, ið ikki geva LLV ans, og kenna møguliga heldur ikki ágóðan av LLV. Felags fyri tey øll er tó, at vegleiðing ikki er veitt við LLL í huga. Tískil hevði næsta stigið verið at knýtt LLV og LLL saman fyri starvsfólk á øllum økjum.

**Góð ráð til íverksetan**

Í fyrsta lagi mæla vit til, at víst verður á hvat LLV er og hvussu LLL og LLV eru tengd saman. Síðani kann verða víst á, hvussu tað kann geva fólki eitt innihaldsríkt arbeiðslív. Hetta er ein tænasta, ið MA-vegleiðarar kunnu veita sum ókeypis kunningarátak. Síðani kunnu MA útbúnir vegleiðarar bjóða vegleiðing fram hjá fyritøkum, ið hava verið til áðurnevnda kunningarátak, tó nú mótvegis gjaldi, ið er ásett í samráð við Vegleiðarafelagið. Hetta tiltak er eitt felags kunningartiltak fyri øll starvsfólk. At enda kunnu MA útbúnir vegleiðarar bjóða fram vegleiðing til fyritøkur, stovnar o.a. Hetta kann vera einstaklinga ella bólkavegleiðing alt eftir, hvat fyritøkan ella stovnurin vil og ynskir.

### *Leiðregla 15: Lívlong vegleiðing til tilkomin arbeiðsleys*

**Lýsing**

Vegleiðing til arbeiðsleys vaksin, snýr seg um vegleiðingaraktivitetir, sum skulu hjálpa tí arbeiðsleysa, sum leitar eftir arbeiði, at betra um arbeiðsførleikan og hjálpa honum/henni aftur á arbeiðsmarknaðin.

Málið við vegleiðingini er, at tann arbeiðsleysi kann aktiverast og integrerast á arbeiðsmarknaðinum. Hetta kann m.a. gerast við førleikameting og profilering.

**Hví tað er týdningarmikið?**

Arbeiðsleys vaksin eru ikki ein einsháttaður bólkur, men er ein samansettur bólkur við ymiskum eyðkennum og tørvum, sum hava tørv á bæði stutt- og langtíðarstuðuli. Tey arbeiðsleysu eru eitt tilfeingi, sum ikki verður gagnnýtt til fulnar. Tað er týdningarmikið fyri bæði samfelagið og tann arbeiðsleysa, at viðkomandi kemur aftur á arbeiðsmarknaðin.

**Hvat er góð mannagongd?**

Góð vegleiðing stuðlar smidligum loysnum fyri einstaklingar, sum hava ymiskar sosialar, arbeiðs- og læruførleikar og ymiskar royndir á arbeiðsloysisøkinum. Arbeiðsætlan fyri hvønn einstakan arbeiðsleysan skal gerast, har serlig atlit verða tikin til avbjóðingar viðv. t.d. heilsu, familju o.s.fr. Vegleiðingin skal eisini virka fyribyrgjandi á tann hátt, at einstaklingar, sum eru útsettir, t.d. einstaklingar, sum eru farnir úr skúlaskipanini tíðliga, og vanta førleikar, ung uttan útbúgving ella arbeiðsroyndir og arbeiðsfólk innan yrki, har stórt umskifti fer fram, vera tiknir við. Miðað eigur at vera eftir, at lívlong vegleiðing verður eitt amboð á arbeiðsmarknaðinum, sum er tillagað til ymiskar málbólkar. Tørvur er á samstarvi millum almennu arbeiðsávísingina (ALS) og útbúgvingarstøð. Eisini er neyðugt við samstarvi millum tey, sum bjóða lívlanga vegleiðing, arbeiðsgevarar og fakfeløg. Tey, sum arbeiða við lívlangari vegleiðing, hava eisini tørv á útbúgving og venjing. Virkast skal fyri, at íverksetan, einstaklingafyritøkur, sosialar verkætlanir og byrjan av virksemi, fær stuðul við hóskandi kunning og vegleiðing.

**Núverandi støðan**

Í løtuni vantar ein væl skipað almenn vegleiðing fyri vaksin, sum hava tørv á vegleiðing. Í dag mást tú verða arbeiðsleys/ur ella sjúk/ur, áðrenn tú fært møguleika at fáa ráðgeving frá AV (Almannaverkinum) ella ALS. Arbeiðarafeløg og arbeiðsgevarar eru sera ymiskt fyri at veita ráðgeving. Hin einstaki og samfelagið høvdu havt gagn av,

at vegleiðing kundi verið veitt einstaklingum og arbeiðsplássum, áðrenn ein kemur út í arbeiðsloysi.

**Góð ráð til íverksetan**
Ein LLV-stovnur ella LLV-skipan, sum kann veita lívlanga vegleiðing, má fáast at virka, sum í samstarvi við hin arbeiðsleysa, og møguliga eisini arbeiðgevarar, kann gera eina ætlan fyri, hvussu tann arbeiðsleysi smidliga kann koma aftur á arbeiðsmarknaðin. Ein skipan eigur eisini at gerast, har arbeiðsleys vaksin verða skrásett, til tess at meta um, hvørjar førleikar viðkomandi hevur, og um neyðugt er við útbúgving/endurbúgving.

Samstarv skal fáast í lag millum stovnin og arbeiðsgevarar og fakfeløg, fyri at gera tað so lætt sum gjørligt hjá tí arbeiðsleysa at koma aftur á arbeiðsmarknaðin, og fyri at tann arbeiðsleysi kann fáa eitt starv, sum hóskar til tann arbeiðsleysa.

## *Leiðregla 16: Lívlong vegleiðing fyri eldri*

**Lýsing**
Tá ið vit skulu greina hugtakið eldri er talan um borgarar, sum eru eldri enn 60 ár. Somuleiðis er tað ein breiður hópur av fólki við ymiskum sjónarmiði í mun til yrki, føleikar, royndir, ítrív og lívið sum heild. Tey eru pensjonistar, arbeiðsleys og fólk, ið arbeiða tíðaravmarkaða ella fulla tíð. Vegleiðing setur seg í samband við henda bólk við at eggja teimum til at vera virkin í arbeiðs- og sosiala lívinum, og at vera sjálvbjargin, meðan tey eldast. Tey eldru eru støðugt longri knýtt at arbeiðslívinum, av neyð ella av ynski. Tey, ið lata seg pensionera ella verða pensionerað, eru ofta enn væl fyri. Ætlanin er, at vegleiðarin fer at veita persónliga vegleiðing til einstaklingin, at eyðmerkja viðkomandi flytbarar førleikar, at staðfesta førleikar, at eggja til framhaldandi læring og lærumøguleikar, ið eru avgerandi fyri, at tey áhaldandi hava møguleika at verða dagførd í samband við tey krøv, ið samfelagið setur á arbeiðsøkinum.

**Hví er hetta týdningarmikið?**
Við vegleiðing er møguleiki at hjálpa einum eldri borgara at menna og tillaga seg til arbeiðsmarknaðin, bæði á sosiala og vinnuliga økinum. Við sær hevur viðkomandi

allarhelst starvsligar royndir, sum yngru ættarliðini kunnu læra nakað av. Vegleiðing kann skapa trivnað og vælveru hjá teimum eldru, tí vegleiðing hjálpir teimum at gagnnýta sínar møguleikar og vera við til at fremja javnvág í samfelagum. Vegleiðing kann sostatt metast at vera ein íløga, tí hon økir um og fær sum mest burtúr úr tí orku og teimum førleikum, ið hesin aldursbólkur hevur. Hví er tað umráðandi at fáa sum mest burtúr? Fleiri og fleiri gerast eldri í dag og hesi gerast ein alsamt størri partur av fólkatalinum. Hetta kann merkja, at hesin aldursbólkur er betri fyri og hevur betri heilsu, enn eldri fólk høvdu fyrr í tíðini. Tað er tó ymiskt, hvussu tey eldru eru fyri, og tey hava somuleiðis ymiskan tørv. Um hugsað verður um áhaldandi at hava virknar eldri borgarar í samfelagnum, bæði sosialt og sum arbeiðsmegi, so er neyðugt at upplýsa um og seta tiltøk í verk, ið kunnu nøkta hesar tørvir. Tað er sjálvandi neyðugt at taka støðið í almennu og heilsustøðu borgarans. Á arbeiðsøkinum er tað óivað tørvur á einum skipaðum endurútbúgvingartilboði, tí yrkisleiðirnar hjá teimum eru allarhelst nógv broyttar, men eisini kann tað vera, at onkur vil royna seg á einum øðrum og nýggjum øki.

### Hvat er góð mannagongd?

Tá ið hugsað verður um at veita LLV fyri eldri, so at tey t.d. kunnu vera virkin sum longst í samfelagnum, so eru nógvar funktiónir, ið tey kunnu virka í, og har eru eisini nógv øki og stovnar, ið kunnu vera við í ætlanini.

### Núverandi støðan hjá "eldri" borgarum

Tey eldru eru støðugt longri knýtt at arbeiðslívinum, av neyð ella av ynski. Tey, ið lata seg pensionera ella verða pensionerað, eru oftast enn væl fyri. Summi teirra óttast fyri, hvat tíðin skal nýtast til, tá arbeiðskarrieran er lokin. Hesi eiga at fáa javnbjóðis vegleiðing í øllum møguleikunum, sum eru í samfelagnum, og um hvussu ein kemur sær upp í ymisk sosial tiltøk. Ein slík lívlong vegleiðing, sum er atkomulig fyri øll, finst ikki sum er.

### Góð ráð til íverksetan

Eldri kunnu virka sum leiðbeinarar hjá yngri fólki, lærumeistarar og stuðlar (mentor skipan). Tey kunnu til dømis veita vegleiðing andlit til andlits ella við e-vegleiðing (KT). Arbeiðsgevarafeløgini og arbeiðarafeløgini, lærara- og pedagogfeløg kunnu samstarva við tey eldru um hetta. LLV og hugtakið um lívlanga læru (LLL) eigur at verða boðið øllum um alt landið. Hetta er nakað almennu lands- og kommunalu

myndugleikarnir mugu samstarva um, so at tað røkkur runt landið til øll øki. Politisku myndugleikarnir eiga eisini at fremja vísindaligar kanningar um LLV og LLL og um týdningin av at vera virkin í samfelagnum. Tey eldru eiga somuleiðis at vera natúrligur partur av leiðsluni í landinum – í landsstýrinum, á løgtingi og í bý- og bygdaráðum. Almenna arbeiðstilvísingin (ALS, Almannaverkið, fjølmiðlar) má stuðla, vegleiða og geva rúm fyri teimum eldru í samfelagnum. Eisini má hon tryggja eina virðiliga umrøðu av teimum eldru, ið gerast ein alsamt størri partur av fólkasamansetingini.

Vit mæla til, at ein skipan verður sett í verk, sum eggjar arbeiðsgevarum at stuðla eldri arbeiðsfólki at dagføra sínar førleikar og styrkja sítt arbeiðsføri.

Hátturin, ið umboð fyri lívlanga vegleiðing kann samráðast við tey ymisku feløgini og stovnarnar, kann vera, at tað vísir á, við kvantitativari og kvalitativari gransking, tørvin á og ágóðan av at veita LLV og LLL. Vegleiðingin kann verða við til at vísa á, at tey eldru sjálvi, men eisini alt samfelagið kann fáa gleði og gagn av, at tey eldru eldast sum ein integreraður partur av samfelagnum, har trivnaður, áhaldandi menning og íkast verða lyklaorðini.

## 2.3 Leiðreglur fyri politikk og skipanir fyri lívlangari vegleiðing av bólkum við serligum avbjóðingum

### *Leiðregla 17: Lívlong vegleiðing fyri viðbrekin ung, sum eru í vandabólki.*

**Lýsing**

Vegleiðing fyri ung folk, sum eru viðbrekin og/ella eru í ”vandabólki”, inniber eina røð av tilboðum, málum og aktivitetum. Hesi miða ímóti at útvega karrieru-undirvísing og vegleiðing í kravdu undirvísingini (fyribyrging), stuðla/ hjálpa næmingum, sum eru í vanda fyri at fella frá í skúlanum (fyribyrging), ella at hjálpa teimum, sum er fallin frá, og sum ikki eru knýtt at nøkrum skúla, eru arbeiðsleys ella eru í starvs-venjing fyri at fáa tey at koma aftur í skúla, í læru, starvs-venjing o.a. (stuðul)

Fyribyrging innan skúlagátt inniber: karrieru-undirvísing og vegleiðing, og menning av CMS í sambandi við undirvísingina hjá ungum viðbreknum fólki, sum eru í vandabólki. Fyribyrging og stuðul hava bæði til endamáls at verða sett í verk tíðliga fyri at hjálpa ungum, sum eru í vanda fyri at fella frá skúlanum. Tað er eyðsæð, at hesi ungu ikki eru ein einsháttaður bólkur, við sama slag av trupulleikum, tí eigur lívlong vegleiðing

(LLV) at byrja við samrøðum og ymiskum aktivitetum, sum hjálpa tí unga at hugleiða um teirra evni, styrkir og veikleikar. Hetta skal hjálpa teimum at vinna á forðingum, tey hava í sambandi við læring og skúlan, og í lívinum sum heild, og føra tey á leið, so tey aftur kunnu byrja í skúla, í læru ella starvsvenjing. Eisini eiga familjan og onnur viðkomandi í umhvørvinum at verða tikin við, tá hond verður tikin um tann unga.

Ungu fólkini, sum eru farin úr skúlanum og ikki eru í læru ella tilknýtt arbeiðsmarknaðinum, hava tørv á at fáa samband við ymiskar stovnar í samfelagnum, og í sambandi við LLV kunnu tey verða kunnaði um hesi viðurskifti, eins og gerast tilvitaði um teirra persónligu evni og ynski til framtíðar møguleikar.

**Hví er hetta týdningarmikið?**

Kanningar innan EU vísa, at ungfólk, sum tíðliga fara úr skúlanum og ikki verða útbúgvin, eru í størri vanda fyri at gerast langtíðararbeiðsleys. Tann fíggjarligi og sosiali ”kostnaðurin” fyri viðbrekin ungfólk er eisini høgur, bæði hjá tí einstaka og hjá skattgjaldaranum, og kostnaðurin økist ígjøgnum lívið. Um tað verður tikið hond um trupulleikarnar tíðliga, lækkar hesin ”kostnaður” nógv.

**Hvat er góð mannagongd?**

At veita trygd fyri, at LLV er partur av skúlagongdini, so vit varnast og kunnu stuðla næmingum, sum eru í vanda fyri at falla frá, av eini ella aðrari orsøk. Á hendan hátt kunnu vit hjálpa teimum við at gera skúlagongdina innihaldsríka, ella hjálpa teimum við einari ætlan, sum skal gera tey før fyri seinni at gera seg lidnan við skúlan.

At bjóða viðbreknum næmingum eina víðfevnandi ætlan, har sosialir mynduleikar, skúlin og onnur viðkomandi, eru við, hetta so vit kunnu taka hond um næmingin, so tíðliga sum til ber, um tað gert neyðugt

At veita trygd fyri, at LLV gert partur av teimum tilboðum, sum samfelagið bjóðar, og at hesi eru løtt at koma fram at. Í hesum sambandi eiga tey ungu at fáa samband ein ávísan persón/málsviðgera, so tey kenna seg trygg.

At veita meira hjálp í umráðum, har fleiri viðbrekin ung eru, og møguleikin fyri fráfalli er størri.

At veita útivirksemi, har ung savnast, fyri at fáa samband við tey, og samstarva við vaksin, sum dagliga hava samband við tey viðbreknu ungu, tá vit bjóða LLV.

At veita trygd fyri, at tey ungu hava eina individuella ætlan, sum umfatar víðari lestur, læru ella arbeiði, og onnur mál í lívinum.

At veita trygd fyri, at skúlar átaka sær at fylgja næmingum upp til tvey ár eftir, at tey eru farin úr skúlanum, og veita teimum LLV. At menna og styrkja ætlanir, sum arbeiða saman við familjunum hjá viðbreknu næmingunum, at vitja familjurnar heima við hús, og skipa fyri t.d. lektiuhjálp heima o.ø., tey hava tørv á.

At øll, sum arbeiða við viðbreknum ungdómi, eiga at fáa serstaka upplæring innan økið.

At virka fyri, at viðbrekin ung við fleiri trupulleikum eiga at fáa eina serstaka individuella ætlan sum inniber samstarv millum øll, sum eru um tey.

At virka fyri, at sosialir mynduleikar og onnur, á øllum stigum, arbeiða saman, so tey ungu fáa bestu korini. At sambondini millum arbeiðsgevarar, skúla og vegleiðing styrkjast, hetta fyri at økja um arbeiðs-, læru- og praktikkmøguleikarnar hjá teimum ungu. (Almannastovan/ALS/Vinnuhúsið o.s.fr.)

**Núverandi støðan**

Í løtuni verða ung viðbrekin fylgd innan skúlagátt og innan Almannaverkið, men falla tey uttan fyri hesar karmar, so vantar eitt alment stað hjá teimum at venda sær til at fáa vegleiðing, førleikameting og samband við arbeiðsmarknað ella útbúgvingar.

**Góð ráð til íverksetan**

Tey viðbreknu ungu eiga at fáa vegleiðing (LLV) har tey eru (í skúla, praktikk, arbeiðsvenjing, ella uttan fyri skúla/arbeiðsmarknaðin o.s.fr.), og byrjast má við samrøðum, har vegleiðari og tann ungi tosa um evni, styrkir, veikleikar, framtíðar ynski o.s.fr. Eftir samrøðurnar kunnu tann ungi og vegleiðarin leggja saman ráð um, hvat skal henda í næstum. Í hesum sambandi er týdningarmikið, at vegleiðarin hevur samband við ymiskar skúlar og arbeiðspláss, so hon/hann kann hjálpa tí unga við at koma í samband við staðið, har viðkomandi ynskir at byrja í skúla ella arbeiða. Eisini eiga sosialu mynduleikarnir og vegleiðingin at hava samband hvørt við annan, tí mangan eru hesi ungu ”læst fast” í skipanini, og sleppa illani víðari – tí eigur skipanin, sum

viðbrekin ung eru í, at gerast meira smidlig. Her kunnu nevnast teir leiðbeinaratímar, sum næmingar á miðnámi onkuntíð fáa – hesir eiga at kunna tillagast støðuni hjá tí unga, so tímarnir koma teimum til góða á besta hátt.

Eisini kann nevnast uppskotið hjá tingkvinnuni Sonju Jógvansdóttir, ”Rúmligi arbeiðsmarknaðurin”, har hon mælir til, at øll arbeiðspláss, sum hava meira enn 20 starvsfólk, eiga at geva rúm fyri fólki við skerdum førleikum. Hesin leistur kann eisini brúkast til viðbrekin ung, sum hava ”snávað” í lívinum – tey kunnu koma út í praktikk í eina ávísa tíð á einum arbeiðsplássi, sum tey ynskja. Eftir eina tíð kann so eftirmetast og tann ungi kann so møguliga koma í læru ella fara í skúla og arbeiða fram ímóti at útbúgva seg innan økið, sum viðkomandi ynskir. Tann ungi kann fara nakrar ferðir í praktikk um hon/hann ikki heilt veit, hvørja yrkisleið hon/hann ynskir at ganga.

Umráðandi er, at skúli, sosialir mynduleikar og arbeiðsmarknaðurin hava samband, so tey kunnu samstarva um viðbrekin ung.

### *Leiðregla 18: Lívlong vegleiðing fyri borgarar við skerdum møguleikum í Føroyum*

**Lýsing**
Henda leiðregla tekur støði í tørvinum fyri lívlangari vegleiðing, LLV, fyri einstaklingar, sum á ein ella annan hátt hava trupult við at finna sína støðu í samfelagnum viðvíkjandi læru, arbeiði og tí sosiala.

Tey, sum hava trupult við at finna sína støðu í samfelagnum, umfata m.a. hesi: serligir tørvir ella óarbeiðsføri; tilflytarar; flóttafólk; børn hjá tilflytarum og flóttafólki. Í hesum bólki eru eisini einstaklingar við persónligum, økonomiskum, sosialum, mentanarligum ella málsligum forðingum, sum gera tað trupult at tillaga seg viðvíkjandi læru, arbeiðsmøguleikum og at luttaka í samfelagnum.

**Hví er hetta týdningarmikið?**
Eins og øll onnur lond í Evropa, hava Føroyar sæð ein støðugan vøkstur av tilflytarum, sum leita sær eftir einari framtíð við m.a. hjúnarbandi, ættleiðing og vón um fíggjarligan framburð. Av tí at fleiri enn 90 tjóðskapir eru umboðaðir í Føroyum, liggur ein stór abyrgd á Landstýrinum at taka sær væl av teimum. Harumframt eru føroyskar familjur, sum flyta heim aftur til Føroyar, og sum hava børn, sum duga illa at samskifta á føroyskum ella donskum. Hesar broytingar eru ein gáva til samfelagið, sum útjavnar

fráflytingina av ungum fólki, sum flyta av landinum í útbúgvingarørindum, serliga til Danmarkar. Hóast jaligu gongdina, so setir henda samfelagsbroytingin krøv til tjóðina, um at seta tiltøk í verk, fyri at birta undir inklusjón, so samfelagið eisini fevnir um hesar nýggju borgararnar, umframt onnur, sum á ein ella annan hátt kenna seg sett uttanfyri samfelagið.

**Hvat er góð mannagongd?**

Hóast royndir og tiltøk eru framd, so er tørvur á framhaldandi mannagongdum fyri at fremja veruliga samfelagsliga luttøku millum tilflytarar. Hesi tiltøk eru:

- sosialráðgevarar skulu taka sær av samansettum avbjóðingum, sum taka atlit til serstakan tørv, t.d. likamlig brek og tørv á arbeiði
- tilflytarum skal standa í boði málskeið í bæði føroyskum og donskum. Hesi skeið skulu vera formlig við akademiskari lesiætlan, so at skeiðsluttakarar fáa førleikaprógv, ið krevst fyri framhaldandi lestur og fyri at fáa betri vinnumøguleikar
- ein metingar- og eftirmetingarkipan má setast á stovn fyri at veita tilflytarum við prógvum frá útlendskum lestraskipanum eina nágreiniliga meting av teirra førleikum. Vegleiðing, um hvat krevst fyri at røkka førleikum innan ta yrkisleið, sum borgarin ynskir førleikamenning innan, eigur at verða bjóðað
- Almannaverkið (AV), og Arbeiðsloysisskipanin (ALS) eiga sum partur av sínari tænastu at bjóða borgarum yrkisvegleiðing. Minnilutabólkar og bólkar við skerdum møguleikum eru altíð í vanda fyri sosialari eksklusión, tí hava hesir bólkar ein serligan tørv á vegleiðing. Hesir bólkar eru ikki einans tilflytarar, men eisini aðrar samfelagsborgarir, ið hava tørv á sosialari hjálp fyri at fóta sær. Her kunna nevnast: Stakir uppihaldarar, arbeiðsleys, tey, ið bera brek ella eru minni ment og eldri borgarar, ið kenna ein tørv at veita til samfelagið
- Vegleiðaratiltøk kunna setast í verk kring landið fyri at stuðla borgarum við skerdum møguleikum og borgarum, ið hava tørv á lívlangari vegleiðing og ráðgeving. Hesi tiltøk kunna verða við regluligum millumbilum í samband og samstarv við kunningartiltøk hjá almannamyndugleikunum, sum kunnu gerast við regluligum lýsingum av vegleiðaratænastum til borgaran

Stevnumiðini umboða bert toppin á ísfjallinum í mun til, hvat kann gerast - við hjálp frá føroysku myndugleikunum fyri at røkka málinum um sosiala inklusion og integration av borgarum við skerdum møguleikum.

**Núverandi støðan**

Útlendingastovan hevur sett integrasjónssamskipara í 2015, har arbeitt verður við einari breiðari loysn á tilflytara- og útlendingamálum. Í løtuni hava borgarar við skerdum møguleikum ikki eitt alment skipað stað við tilboðum um hvar tey kunnu venda sær til at fáa vegleiðing, førleikameting og samband við arbeiðsmarknað ella útbúgvingarmøguleikar.

**Góð ráð til íverksetan**

Vit mæla til, at ein almenn skipað LLV tænasta stendur hesum samfelagsbólki í boði. Ein væl skipað LLV tænasta samstarvar við og byggir brýr millum ymsu almennu stovnarnar við tí fyri eyga at menna trivnað og inklusión í samfelagnum fyri allar borgarar. Síðani mæla vit til, at afturvendandi vegleiðaratiltøk verða sett í verk runt landið, har vegleiðarar møta og stuðla borgarum við skerdum møguleikum og borgarum, ið hava tørv á lívlangari vegleiðing.

# 3. Niðurstøða

Henda uppgáva lýsir støðuna innan lívlanga vegleiðing í Føroyum og tillagar altjóða leiðreglur til føroysk viðurskifti. Hóast vit ikki hava siðvenju í Føroyum fyri at gera heildarætlanir, sum røkka tvørtur um almenna og privata geiran, er tað nógv sum bendir á, at vit mugu fara undir at gera slíkar ætlanir, um vit vilja útbyggja eitt seinmodernað samfelag, ið kann samanberast við okkara grannatjóðir,.

Neyðugt er alt fyri eitt at fara undir stigvísa tilgongd at skipa lívlanga vegleiðing, LLV, sum er atkomilig hjá øllum borgarum í Føroyum. Tørvur er á einari tjóðarætlan fyri lívlanga vegleiðing, tí arbeiðsmarknaðurin er sera nógv broyttur seinastu árini, og altjóðagerðin hevur stóra ávirkan á arbeiðsmegi okkara. Politikkarar og embætisfólk úr MMR, UVMR og AMR, umboð fyri Fróðskaparsetur Føroya og MA lesandi í vegleiðing eiga at seta seg saman at samskipa og menna gongda leið fyri lívlanga vegleiðing, við tí fyri eyga at skapa trivnað, inklusión, samfesti og lívsvirðisvøkstur í føroyska nútíðarsamfelagnum (Arbejderbevægelsens Erhvervsråd, 2015). Professionelt útbúnir vegleiðarar kunnu veita lívlanga vegleiðing, sum tekur atlit til hesi viðurskifti. Útlitini eru góð, tí gongst sum ætlað, verða fyrstu MA-lesandi í vegleiðing liðug við útbúgvingina á várið 2017. Tá hevur føroyska samfelagið fleiri vælútbúnar og virkisfúsar vegleiðarar.

# Keldur til leiðreglurnar 1-18

### *Leiðregla 1*

**<u>Tilfeingi fyri stevnumyndarar (policymakers)</u>**

**ELGPN (2012)** ***Lifelong Guidance Policy Development: A European Resource Kit.***

**Chapter 4** ***Career Management Skills*****.**

http://www.elgpn.eu/publications/browse-by-language/english/ELGPN_resource_kit_2011-12_web.pdf/

Available in the following languages: Croatian, Dutch, English, Estonian, Finnish, French, German, Greek, Hungarian, Italian, Latvian, Lithuanian, Polish, Portuguese

**ELGPN (2012) Concept Note No.** ***3 Career Management Skills: Factors in Implementing Policy Successfully***

http://www.elgpn.eu/publications/browse-by-language/english/Gravina_and_Lovsin_cms_concept_note_web.pdf/ Available in the following languages: Croatian, Dutch, English, German, Greek, Latvian, Portuguese

**- Hooley, T., Watts, A.G., Sultana, R.G., and Neary, S.** ***The 'Blueprint' framework for career management skills: a critical exploration.*** *British Journal of Guidance & Counselling, 2013 Vol. 41, No. 2, 117131*

http://www.tandfonline.com/doi/pdf/10.1080/03069885.2012.713908

### *Leiðregla 2*

**<u>Tilfeingi fyri stevnumyndarar (policymakers)</u>**

**ELGPN (2012)** ***Lifelong Guidance Policy Development: A European Resource Kit*** **Chapter 5** ***Access.***

http://www.elgpn.eu/publications/browse-by-language/english/ELGPN_resource_kit_2011

12_web.pdf/

Available in the following languages: Croatian, Dutch, English, Estonian, Finnish, French, German, Greek, Hungarian, Italian, Latvian, Lithuanian, Polish, Portuguese

**OECD (2001)**: ***The Role of Information and Communication Technologies in an integrated career information and guidance system***.

http://www.oecd.org/edu/research/2698249.pdf Available in English and French

*Leiðregla 3*

**Tilfeingi fyri stevnumyndarar (policymakers)**

**-ELGPN (2012)** ***Lifelong Guidance Policy Development: A European Resource Kit*** **Chapter 6** ***Quality and Evidence***, **and Annex D** ***Quality Assurance and Evidence-Base Framework***

http://www.elgpn.eu/publications/browse-by-language/english/ELGPN_resource_kit_2011-12_web.pdf/

Available in the following languages: Croatian, Dutch, English, Estonian, Finnish, French, German, Greek, Hungarian, Italian, Latvian, Lithuanian, Polish, Portuguese

*Leiðregla 4*

**Tilfeingi fyri stevnumyndarar (policymakers)**

**ELGPN (2014)** ***The Evidence Base on Lifelong Guidance: A Guide to Key Findings for Effective Policy and Practice.*** Available in English in full and summary forms. http://www.elgpn.eu/publications/

**ELGPN (2012)** ***Lifelong Guidance Policy Development: A European Resource Kit*** **Chapter 6** ***Quality and Evidence***, **and Annex D** ***Quality Assurance and Evidence-Base Framework***

http://www.elgpn.eu/publications/browse-by-language/english/ELGPN_resource_kit_2011-12_web.pdf/

Available in the following languages: Croatian, Dutch, English, Estonian, Finnish, French, German, Greek, Hungarian, Italian, Latvian, Lithuanian, Polish, Portuguese

### *Leiðregla 5*

**Tilfeingi fyri stevnumyndarar (policymakers)**

**ELGPN (2014)** ***The Evidence Base on Lifelong Guidance: A Guide to Key Findings for Effective Policy and Practice.*** Available in English in full and summary forms. http://www.elgpn.eu/publications/

**ELGPN (2012)** ***Lifelong Guidance Policy Development: A European Resource Kit*** **Chapter 6** ***Quality and Evidence*****, and Annex D** ***Quality Assurance and Evidence-Base Framework***

http://www.elgpn.eu/publications/browse-by-language/english/ELGPN_resource_kit_2011-12_web.pdf/

Available in the following languages: Croatian, Dutch, English, Estonian, Finnish, French, German, Greek, Hungarian, Italian, Latvian, Lithuanian, Polish, Portuguese

### *Leiðregla 6*

**Tilfeingi fyri stevnumyndarar (policymakers)**

**ELGPN (2014)** ***The Evidence Base on Lifelong Guidance: A Guide to Key Findings for Effective Policy and Practice.*** Available in English in full and summary forms. http://www.elgpn.eu/publications/

**ELGPN (2012)** ***Lifelong Guidance Policy Development: A European Resource Kit*** **Chapter 6** ***Quality and Evidence*****, and Annex D** ***Quality Assurance and Evidence-Base Framework***

http://www.elgpn.eu/publications/browse-by-language/english/ELGPN_resource_kit_2011-12_web.pdf/

Available in the following languages: Croatian, Dutch, English, Estonian, Finnish, French, German, Greek, Hungarian, Italian, Latvian, Lithuanian, Polish, Portuguese

*Leiðregla 7*

**Tilfeingi fyri stevnumyndarar (policymakers)**

**CEDEFOP (2009)** ***Professionalising Career Guidance: Practitioner Competences and Qualification Routes in Europe***

http://www.cedefop.europa.eu/EN/Files/5193_en.pdf Available in English and German

**EUROPEAN COMMISSION (2014)** ***European Reference Competence Profile for PES and EURES counsellors*** **DG Employment, Social Affairs, and Inclusion: Brussels**

**OECD (2001)** ***The Skills, Training, and Qualification of Guidance Workers***

http://www1.oecd.org/edu/innovation-education/2698214.pdf Available in English and French

*Leiðregla 8*

**Tilfeingi fyri stevnumyndarar (policymakers)**

**OECD (2002)** ***An Occupation in Harmony: The Role of Markets and Governments in Career Information and Career Guidance***

http://www.oecd.org/education/innovation-education/1954694.pdf Available in English and French

**Leinkjur:**

- http://derby.openrepository.com/derby/bitstream/10545/559030/1/Careers+England+Research+Paper+-The+Economic+Benefits+of+Career+Guidance+-+July+2015.pdf
- http://link.springer.com/article/10.1007/s10775-005-1025-y
- http://www.gov.scot/resource/doc/344766/0114737.pdf

*Leiðregla 9*

**Tilfeingi fyri stevnumyndarar (policymakers)**

**ELGPN (2012):** ***European Lifelong Guidance Policies: Progress Report 2011-12. A Report of the European Lifelong Guidance Policy Network.*** Jyväskylä, Finland: University of Jyväskylä. http://www.elgpn.eu/publications/elgpn-progress-report-2011-2012

**OECD (2001)**: ***The Role of Information and Communication Technologies in an integrated career information and guidance system***.

http://www.oecd.org/edu/research/2698249.pdf Available in English and French

**NCDA (1997)** ***Guidelines for the Use of the Internet for the Provision of Career Information and Planning Services***

http://www.ncda.org/aws/NCDA/pt/sp/guidelines_internet

*Leiðregla 10*

**Tilfeingi fyri stevnumyndarar (policymakers)**

**ELGPN (2012):** ***European Lifelong Guidance Policies: Progress Report 2011-12. A Report of the European Lifelong Guidance Policy Network.*** Jyväskylä, Finland: University of Jyväskylä. http://www.elgpn.eu/publications/elgpn-progress-report-2011-2012

**OECD (2001)**: ***The Role of Information and Communication Technologies in an integrated career information and guidance system***.

http://www.oecd.org/edu/research/2698249.pdf Available in English and French

**NCDA (1997)** ***Guidelines for the Use of the Internet for the Provision of Career Information and Planning Services***

http://www.ncda.org/aws/NCDA/pt/sp/guidelines_internet

*Leiðregla 11*

**Tilfeingi fyri stevnumyndarar (policymakers)**

**ELGPN (2012)** ***Lifelong Guidance Policy Development: A European Resource Kit.***

**Chapters 4 to 7 cover the application of the Resource Kit to policies for lifelong guidance in VET**

http://www.elgpn.eu/publications/browse-by-language/english/ELGPN_resource_kit_2011

12_web.pdf/

Available in the following languages: Croatian, Dutch, English, Estonian, Finnish, French, German, Greek, Hungarian, Italian, Latvian, Lithuanian, Polish, Portuguese

**ELGPN (2012) Concept Note No. 2 *Youth Unemployment***

http://www.elgpn.eu/publications/elgpn-concept-note-youth-unemployment Available in Croatian, English, Dutch, Greek, Latvian, and Portuguese.

**ELGPN (2013) Concept Note No. 4 *The Youth Guarantee and Lifelong Guidance***

http://www.elgpn.eu/publications/browse-by-language/english/Borbely-Pecze_and_Hutchinson_Youth_Guarantee_concept_note_web2.pdf/ Available in Croatian, English, German, and Latvian.

**CEDEFOP (2014) *The Attractiveness of Initial Vocational Education and Training: Identifying What Matters***

http://www.cedefop.europa.eu/EN/publications/22510.aspx

**CEDEFOP (2013) *Keeping Young People in (Vocational) Education: What Works?***

http://www.cedefop.europa.eu/EN/Files/9084_en.pdf Available in French, German, Greek, Italian, Lithuanian, Polish, Portuguese, and Spanish.

**CEDEFOP (2011) *Guidance Supporting Europe's Aspiring Entrepreneurs***

http://www.cedefop.europa.eu/EN/publications/18285.aspx

**ELGPN (2013) Concept Note No. 4 *The Youth Guarantee and Lifelong Guidance***

http://www.elgpn.eu/publications/browse-by-language/english/Borbely-Pecze_and_Hutchinson_Youth_Guarantee_concept_note_web2.pdf/ Available in Croatian, English, German, and Latvian.

**Ressources for policy makers:**

**Stop & Go:** program í Luxembourg, sum er ætlað næmingum 15-16 ár sum ein transitións tíðarskeið frá fólkaskúla til miðnám, har dentur er á sjálvsálit, sjálvsvirðing, at læra at taka avgerðir og at taka stig til grunda á avgerðir.

**Job exposure:** frá Malta har næmingar í 14-15 ára aldur fara á í starvsroynd innan fíggjarheimin, heilsuverkið og innan kunningartøkni. Næmingarnir eygleiða starvsfólk í teira arbeiði og fáa sjálvi smáar uppgávur at loysa. Tey fáa eina logbók har tey skriva sínar tankar í samband við praktikkina. “Job exposure” ger at næmingurin sær sambandi millum útbúgving og arbeiði og harvið hjálpir næmingin í skiftinum frá fólkaskúla til víðari útbúgving.

**Personal Training Record:** er italski hátturin at savna inn og skráseta ymsu førleikarnar ið borgarin fær í einum PTR skeiði. Endamálið er at kunna vísa á sínar royndir og førleikar í sambandi við skiftið frá skúla til yrkið.[1]

**Accreditation of Prior Learning:** er skipan í Svøríki har ein kann fáa viðurkent sínar royndir og soleiðis við stuðli frá vegleiðara kann sleppa á skeið og har vera mett við hjálp frá royndum handverkarum.

**COG:** Career Orientation and Guidance) hálendsk skipan har hálendska mentamálaráðið í 2013 hevði eina verkætlan, ið hevði til endamáls at fyribyrgja fráfall hjá næmingum innan yrkisútbúgvingarnar. Verkætlanin var ein roynd at menna vitanina hjá næmingunum um sínar førleikar, evnir og møguleikar soleiðis, at næmingurin kundi taka eina tilvitaða avgerð um sítt val av yrki ella víðari útbúgving.[2]

### *Leiðregla 12*

**Tilfeingi fyri stevnumyndarar (policymakers)**

**ELGPN (2012) *Lifelong Guidance Policy Development: A European Resource Kit.***

**Chapters 4 to 7 cover the application of the Resource Kit to policies for lifelong guidance in higher education**

[1] Lifelong Guidance policy development: A European Resource Kit: p. 25-26
[2] Ibid p: 41

http://www.elgpn.eu/publications/browse-by-language/english/ELGPN_resource_kit_2011

12_web.pdf/

Available in the following languages: Croatian, Dutch, English, Estonian, Finnish, French, German, Greek, Hungarian, Italian, Latvian, Lithuanian, Polish, Portuguese

**ELGPN (2012) Concept Note No. 2 *Youth Unemployment***

http://www.elgpn.eu/publications/elgpn-concept-note-youth-unemployment Available in Croatian, Dutch, English, Greek, Latvian, and Portuguese.

**ELGPN (2013) Concept Note No. 4 *The Youth Guarantee and Lifelong Guidance***

http://www.elgpn.eu/publications/browse-by-language/english/Borbely-Pecze_and_Hutchinson_Youth_Guarantee_concept_note_web2.pdf/ Available in Croatian English, German, and Latvian.

**ENQA (2009) *Standards and Guidelines for Quality Assurance in the European Higher Education Area* (Sections 1.5-1.7)**

http://www.enqa.eu/wp-content/uploads/2013/06/ESG_3edition-2.pdf

**CEDEFOP (2011) *Guidance Supporting Europe's Aspiring Entrepreneurs***

http://www.cedefop.europa.eu/EN/publications/18285.aspx

*Leiðregla 13*

<u>**Tilfeingi fyri stevnumyndarar (policymakers)**</u>

**ELGPN (2012) *Lifelong Guidance Policy Development: A European Resource Kit.***

**Chapters 4 to 7 cover the application of the Resource Kit to policies for lifelong guidance in adult education.**

http://www.elgpn.eu/publications/browse-by-language/english/ELGPN_resource_kit_2011

12_web.pdf/

Available in the following languages: Croatian, Dutch, English, Estonian, Finnish, French, German, Greek, Hungarian, Italian, Latvian, Lithuanian, Polish, Portuguese

**CEDEFOP (2011)** ***Guidance Supporting Europe's Aspiring Entrepreneurs***

http://www.cedefop.europa.eu/EN/publications/18285.aspx

*Leiðregla 14*

**Tilfeingi fyri stevnumyndarar (policymakers)**

**ELGPN (2012)** ***Lifelong Guidance Policy Development: A European Resource Kit.***

**Chapters 4 to 7 cover the application of the Resource Kit to policies for lifelong guidance in the employment sector**

http://www.elgpn.eu/publications/browse-by-language/english/ELGPN_resource_kit_2011

12_web.pdf/

Available in the following languages: Croatian, Dutch, English, Estonian, Finnish, French, German, Greek, Hungarian, Italian, Latvian, Lithuanian, Polish, Portuguese

**ELGPN Concept Note No. 1** ***Flexicurity: Implications for Lifelong Guidance***

http://www.elgpn.eu/publications/browse-by-language/english/Sultana_Flexicurity_concept_note_web.pdf/ Available in Croatian, Dutch, English, German, Greek, Latvian, and Portuguese.

**CEDEFOP (2008)** ***Career Development at Work: A Review of Career Guidance to Support People in Employment***

http://www.cedefop.europa.eu/EN/publications/12936.aspx Available in English and German.

**CEDEFOP (2014)** ***Navigating Difficult Waters: Learning for Career and Labour Market Transitions***

http://www.cedefop.europa.eu/EN/Files/5542_en.pdf

**CEDEFOP (2014)** ***Use of Validation by Enterprises for Human Resources and Career Development Purposes***

http://www.cedefop.europa.eu/EN/publications/23963.aspx

*Leiðregla 15*

**Tilfeingi fyri stevnumyndarar (policymakers)**

**ELGPN (2012)** ***Lifelong Guidance Policy Development: A European Resource Kit.***

**Chapters 4 to 7 cover the application of the Resource Kit to policies for lifelong guidance in the employment sector**

http://www.elgpn.eu/publications/browse-by-language/english/ELGPN_resource_kit_2011

12_web.pdf/

Available in the following languages: Croatian, Dutch, English, Estonian, Finnish, French, German, Greek, Hungarian, Italian, Latvian, Lithuanian, Polish, Portuguese

**ELGPN Concept Note No. 1** ***Flexicurity: Implications for Lifelong Guidance***

http://www.elgpn.eu/publications/browse-by-language/english/Sultana_Flexicurity_concept_note_web.pdf/ Available in Croatian, Dutch, English, German, Greek, Latvian, and Portuguese.

**CEDEFOP (2008)** ***Career Development at Work: A Review of Career Guidance to Support People in Employment***

http://www.cedefop.europa.eu/EN/publications/12936.aspx Available in English and German.

**CEDEFOP (2014)** ***Navigating Difficult Waters: Learning for Career and Labour Market Transitions***

http://www.cedefop.europa.eu/EN/Files/5542_en.pdf

**CEDEFOP (2014)** ***Use of Validation by Enterprises for Human Resources and Career Development Purposes***

http://www.cedefop.europa.eu/EN/publications/23963.aspx

*Leiðregla 16*

**<u>Tilfeingi fyri stevnumyndarar (policymakers)</u>**

**CEDEFOP (2008)** ***Career Development at Work: A Review of Career Guidance to Support People in Employment***

http://www.cedefop.europa.eu/EN/publications/12936.aspx Available in English and German.

**CEDEFOP (2014)** ***Navigating Difficult Waters: Learning for Career and Labour Market Transitions***

http://www.cedefop.europa.eu/EN/Files/5542_en.pdf

**CEDEFOP (2014)** ***Use of Validation by Enterprises for Human Resources and Career Development Purposes***

http://www.cedefop.europa.eu/EN/publications/23963.aspx

**CEDEFOP (2013)** ***Return to Work: Work-based Learning and the Reintegration of Unemployed Adults into the Labour Market***

http://www.cedefop.europa.eu/EN/Files/6121_en.pdf Available in French, German, Greek, Italian, Lithuanian, Polish, Portuguese and Spanish.

**CEDEFOP (2012)** ***Working and Ageing: The Benefits of Investing in an Ageing Workforce***

http://www.cedefop.europa.eu/EN/publications/20649.aspx

**CEDEFOP (2011) *Working and Ageing: Guidance and Counsellors for Mature Learners***

http://www.cedefop.europa.eu/EN/publications/19076.aspx

*Leiðregla 17*

**Tilfeingi fyri stevnumyndarar (policymakers)**

**ELGPN (2014) Concept Note No. 6 *Early School Leaving & Lifelong Guidance***

**ELGPN (2012) Concept Note No. 2 *Youth Unemployment***

http://www.elgpn.eu/publications/elgpn-concept-note-youth-unemployment Available in Croatian, Dutch, English, Greek, Latvian, and Portuguese.

**ELGPN (2013) Concept Note No. 4 *The Youth Guarantee and Lifelong Guidance***

http://www.elgpn.eu/publications/browse-by-language/english/Borbely-Pecze_and_Hutchinson_Youth_Guarantee_concept_note_web2.pdf/ Available in Croatian English, German, and Latvian.

*Leiðregla 18*

**Tilfeingi fyri stevnumyndarar (policymakers)**

**ELGPN (2012) Concept Note No. 2 *Youth Unemployment***

http://www.elgpn.eu/publications/elgpn-concept-note-youth-unemployment Available in Croatian, Dutch, English, Greek, Latvian, and Portuguese.

**ELGPN (2013) Concept Note No. 4 *The Youth Guarantee and Lifelong Guidance***

http://www.elgpn.eu/publications/browse-by-language/english/Borbely-Pecze_and_Hutchinson_Youth_Guarantee_concept_note_web2.pdf/ Available in Croatian, English, German, and Latvian.

**ELGPN (2014) Concept Note No. 6 *Early School Leaving & Lifelong Guidance***

**CEDEFOP (2013) *Guidance for Immigrants: The Labour Market Potential of Diversity***

Presentations and papers from a peer learning event.

http://www.cedefop.europa.eu/EN/events/22313.aspx

**CEDEFOP (2013)** ***Empowering Vulnerable Adults to Tackle Labour Market Challenges***

http://www.cedefop.europa.eu/EN/publications/21318.aspx

# Keldur


5th Draft. (15. 12 2014). *Guidelines for Policies and Systems Development for Lifelong Guidance, A reference framework for the EU and the Commision*. ELGPN.

*AE Arbejderbevægelsens Erhvervsråd*. (22. 12 2015). Hentet fra Bilag: Livsværditilvækst og samfundsøkonomisk afkast: http://www.ae.dk/bilag-livsvaerditilvaekst-og-samfundsoekonomisk-afkast

*ALS*. (13. 12 2015). Hentet fra www.als.fo

*AMR*. (08. 01 2016). Hentet fra Almannaráðið: http://www.amr.fo/

Arbeiðsbólkur. (22. 12 2015). *Álit um at endurskoða vegleiðaraskipanina*. Hentet fra MMR: http://www.mmr.fo/kunning/alit/alit-um-at-endurskoda-vegleidingarskipanina-10-desember-2007/

*CEDEFOP*. (30. 11 2015). Hentet fra European Centre for Development of Vocational Training: http://www.cedefop.europa.eu/en/events-and-projects/projects/lifelong-guidance

*ELGPN*. (20. 12 2015). Hentet fra European Lifelong Guidance Policy Network: http://www.elgpn.eu/

*Mál at fremja - Fylgiskjal til samgonguskjalið millum Javnaðarflokkin, Tjóðveldi og Framsókn* . (14. 09 2015). Hentet fra KVF: http://kvf.fo/sites/default/files/fylgiskjal-mal-at-fremja-kvf-fo-avrit.pdf

*MMR*. (13. 12 2015). Hentet fra Mentamálaráðið, Ministry of Education, Research and Culture: http://www.mmr.fo/framsida/

*Samtak*. (13. 12 2015). Hentet fra Samslutning af færøske fagforeninger: http://www.samtak.fo/

*UVMR*. (13. 12 2015). Hentet fra Uttanríkis- og vinnumálaráðið, Ministry of Foreign Affairs and Trade: http://www.uvmr.fo/

*Vinnuhúsið*. (13. 12 2015). Hentet fra Industriens Hus: http://www.vinnuhusid.fo/

*VOX, Nationalt Fagorgan for kompetencepolitik*. (09. 01 2016). Hentet fra European Agenda for Adult Learning: http://www.vox.no/English/international-cooperation/European-Agenda-for-Adult-Learning/

Vuorinen, D. R., & Watts, P. A. (2012). *ELGPN.* Saarijärvi: Saarijärven Offset Oy. Hentet fra Lifelong Guidance Policy Development: A European Resource Kit Chapter 6 Quality and Evidence, and Annex D Quality Assurance and Evidence-Base Framework: http://www.elgpn.eu/publications/browse-by-language/english/ELGPN_resource_kit_2011-12_web.pdf/

*Yrkisdepilin*. (09. 01 2016). Hentet fra Fundur í Yrisútbúgvingarráðnum á Hotel Norð á Viðareiði, 18.jan 2013: http://yrkisdepilin.fo/Default.aspx?ID=13450